# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG
01
11

FØROYA
PEDAGOG
FELAG

## VALEVNINI






www. pedagogfelag. fo

# Úr innihaldinum


Oddagrein 2
Tíðindi frá felagnum 4
Nýggj lóg um Arbeiðsskaða trygging 6
Leiðararáðið á ráðstevnu 8
Felagsins aktións og upplýsingargrunnur 10
Talufrælsi og limaskyldur 11
Tiga ella tala 11
Ikki bert stjórar eiga at úttala seg 12
Kunnu úttala seg egna vegna 13
At rúmast á arbeiðsmarknaðinum 14
Arbeiðsmarknaðurin skal gerast enn rúmligari 17
Daysi er í vardum starvi – gott at sleppa til arbeiðis 18
Arbeiðseftirlitið 19
Syngja sama lag 20
Aðalfundur 2011 21
Aðalfundarskráin 22
Frágreiðing frá nevdini 25
Valevnini 28
Sáttmáli Sameindu Tjóða 30
Millumlanda samstarv um barnagarðsarbeiði í náttúruni 35
Menning av barninum 38
Nýklaktir námsfrøðingar á føroya læraraskúla 39
Nýklaktir námsfrøðingar í netlesnaði 41
Praktisku royndirnar komu væl við 41


# KOLOFON


**ÚTGEVARI:**
Føroya Pedagogfelag, Postboks 318
110 Tórshavn – Tlf. 35 75 76 – Fax 35 75 73
pedagog@pedagogfelag.fo – www. pedagogfelag.fo
**LAGT TIL RÆTTIS:** Sp/f Rit & Ráð
Tel. 22 92 42 – www. ritrad.fo
**UMBRÓTINGING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ:**
Føroyaprent – www. foroyaprent.fo
**ÁBYRGDARBLAÐSTJÓRI:** Muad Wang Hansen
maud@pedagogfelag.fo
**BLAÐIÐ VERÐUR PRENTAÐ** í 2500 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis
**ONNUR ÁHUGAÐI** kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.


**LOYVT ER** at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705


# Oddagrein

Maud Wang Hansen, forkvinna



## Góðu limir

Nú stundar tíðin til aðalfundin aftur, og eitt ár er runnið, síðan formansskiftið var. Nógv hevur verið at seta seg inn í og taka sær av, og samráðingarnar hava verið drúgvar og hava tikið nógva tíð. Nógv er eftir at náa, og nógv tøk eru enn at taka fyri at fremja ætlaðu broytingarnar. Sum forkvinna eri fegin um góðar afturmeldingar frá limunum, og tað er mín vón, at allir limir eru nøgdir við viðgerðina hjá felagnum. Um ikki, so er tað eisini mín vón, at tit gera vart við tykkum.

Eingin limur skal halda seg aftur við at venda sær til sítt fakfelag. Í blaðnum hesa ferð verður varpað ljós á talufrælsi og rættindi hjá limunum og á rættindi hjá fólki við menningartarni, eins og tað á aðalfundinum verður varpað ljós á rættindi hjá børnum og fólki við breki. Í stuttum kunnu vit siga, at mannarættindi eru á breddanum hesa ferð.

Aðalfundurin kemur sostatt at standa í ljósinum av ST-sáttmálanum fyri børn og ST-sáttmálanum fyri fólk, sum bera brek. Tveir forvitnisligir fyrilestrar verða á aðalfundinum, m.a. fyri at varpa ljós á rættindini hjá teimum borgarum, sum limirnir í Føroya Pedagogfelag dagliga hava ábyrgdina av at menna og geva eitt ríkt og virðismikið lív, har tey við rætti til ávirkan á egin viðurskifti eru tryggjað góðar lívsumstøður.

Barnarættindasáttmálin var til próvtøku hjá ST í byrjanini av hesum árinum, og Føroyar fingu ikki besta karakter. Tað er mín vón, at tey viðurskifti, sum gera, at vit ikki liggja ovast í metingini í løtuni, verður hond tikin um nú. Tað er undrunarsamt, at eingin almenn umrøða hevur verið av hesi próvtøku. Føroya Pedagogfelag hevur áhuga í at vita, hví vit ikki fingu besta karakter, og undrast á, um eingin er, sum hevur skyldu at geiða okkum frá hesum? Eftir mínari meting kunnu vit ikki liva við at fara til próvtøku fimta hvør ár hjá ST og koma heim aftur við einari staðfesting av, at børn í Føroyum ikki hava nóg góð rættindi og lívsviðurskifti. Vit eiga at krevja, at børn og fólk við breki í Føroyum hava tað so gott, at vit altíð koma at liggja ovasat á breddanum. Hetta er eftir mínari meting ein størri og týdningarmiklari próvtøka enn PISA kanningarnar, sum ikki sørt av hóvastáki stendst av.

Við 46 vaksnum fólkum við menningartarni á bíðilista til ein bústað og ikki nóg mikið av tilboðum um arbeiði og mentanarlív verður torført at fáa góðan karakter hjá ST. Hvar blívur forsorgarlógin av, og hvussu leingi skulu vit bíða eftir, at almennu skipanirnar arbeiða saman, so vit fáa ta sokallaðu sektorábyrgdina at virka. Hvussu leingi skulu børn liva í heimum við harðskapi, og hvussu leingi skulu børn liva við, at vit ikki hava ráð til at veita viðgerð og ta námsfrøðiligu hjálp, teimum tørvar fyri at klára seg væl. Helst skulu vit kunna veita okkara børnum og fólki við menningartarni so góða hjálp, at onnur lond í ST fara at spyrja okkum, hvussu vit bera okkum at.

Ein týdningarmikil partur av aðalfundinum er nevndarval og lógarbroytingar. Tað er altíð spennandi, tá nevndarval er á skránni, og vit vænta tí góða undirtøku á fundinum. Tað kann tykjast heldur turrisligt at skula fremja lógarbroytingar, men hetta er neyðugt og eitt ynski frá tykkum limum frá fleiri aðalfundum. Fyri at fundurin ikki skal gerast alt ov formligur, verður skipað fyri onkrum undirhaldi, og um kvøldið kemur eitt kvinnuorkestur at spæla fyri okkum aftaná náttúrðan.

Góðu limir, tað er mín vón, at tit møta fjølment upp. Eg fari at ynskja øllum ein góðan aðalfund.

*Vit síggjast 19. mars á Hotel Føroyum*


Betri at hava gott í væntu
Betri pensjón tryggjar tær eina munagóða samansparing, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.
Við Betri pensjón hevur tú fult gjøgnumskygni. Tú sært, hvussu nógv tú sparir saman til eftirløn, hvussu nógv fer til tryggingar, og hvussu nógv verður goldið fyri umsiting.
Harafturat kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri, um tú samlar tínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tína pensjón hjá Betri pensjón.
Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni tryggingar- og pensjónsviðurskifti. Meiri fæst at vita á telefon 345 700 ella við at senda ein teldupost til betri@betri.fo.
betri.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari
Betri pensjón

# NEVND



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Jógvan Philbrow**
Næstformaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Sigga Joensen**
Skrivari
sigga@pedagogfelag.fo



**Jórun Ennistíg**
Kassameistari



**Elin N. W. Tausen**
nevndarlimur

# UMSITING



**Maud Wang Hansen**
Forkvinna
maud@pedagogfelag.fo



**Katrin H. Thomsen**
Fyrisitingarleiðari
katrin@pedagogfelag.fo



**Anna Dalsgarð**
Bókhaldari
anna@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

## *Aðalfundurin*

Aðalfundurin verður á Hotel Føroyum leygardagin 19. mars kl. 10.00
Innskriving til aðalfundin byrjar kl. 9.00

## *Brævatkvøður*

Teir limir, ið ynskja at greiða brævatkvøðu til nevndarvalið, skulu persónliga venda sær til felagið, antin við telduposti til pedagog@pedagogfelag.fo ella við at ringja til felagið á 35 75 76.
Brævatkvøðuseðilin skal vera advokati felagsins í hendi í seinasta lagi vikudagin undan aðalfundinum t.e. leygardagin 12. mars 2011.
Upplýsast skal: Navn, føðingardagur, bústaður, arbeiðspláss og fartlf.nr.

## *Gisting*

Felagið hevur gjørt avtalu við Hotel Føroyar um at limir, ið samband við aðalfundin kunnu gista á hotellinum fyri

Kr. 600.- fyri einkult rúm v/morgunmati
Kr. 800.- fyri dupultrúm (2 pers.) v/morgunmati

## NEVNDARVALIÐ

Jan Mølvad Laursen, pedagogur -tekur ikki við afturvalið
Jógvan Philbrow, pedagogur - tekur við afturvalið
Sigga Óladóttir Joensen, pedagogur - tekur ikki við afturvalið

Viðmerkjast skal, at Jan Mølvad Laursen, ið varð valdur á aðalfundinum í 2010, segði seg úr nevndini í januar 2011, og Elin N.W. Tausen, fyrstvaldi eykalimur, hevur sæti í nevndini fyri hann hetta fram til aðalfundin. - Tað merkir, at ein av nevndarlimunum tí bert skal veljast fyri eitt ár.

**VALEVNINI**



Elin N.W. Tausen, *pedagogur*



Guðrun Eysturlíð *pedagogur*



Jannie Jacobsen, *hjálparfólk*



Jógvan Philbrow, *pedagogur*

Trý fólk skulu veljast í nevndina, tvey fyri tvey ár og eitt fyri eitt ár.
Atkvøtt verður fyri øllum trimum undir einum, soleiðis, at tann sum fær flest atkvøður er 1. valdur, tann sum fær næstflest atkvøður er 2.valdur og tann sum fær triðflest atkvøður er 3.valdur.

1.- og 2. valdi nevndarlimur fær sæti í nevndini í tvey ár og tann sum er 3. valdur fær sæti í nevndini í eitt ár.

Nevndin skipar seg á fyrsta nevndarfundi eftir aðalfundin.

# Hjálparfólk fáa greiða pensjón í BankNordik

BANK**NORDIK**

**Hjálparfólk fáa eina pensjón í BankNordik, har arbeiðsgevarin rindar 10% afturat lønini. Pedagogfelagið hevur serligan sáttmála við BankNordik um hesar pensjónskontur. Eins og allir aðrir limir í Pedagogfelagnum eru hjálparfólk í fastløntum starvi eisini fevnd av eini samlagstrygging.**

**Pensjónin gevur tær eitt gott grundstøði og kann tillagast til júst tín tørv.**

**Hjá okkum fært tú holla ráðgeving um, hvørt tær tørvar at rinda meira fyri at fáa eina nøktandi pensjón, og um tín trygging er nøktandi. Eisini fært tú ráðgeving um tínar møguleikar fyri størri avkasti.**

## Bílegg eitt prát

**Ring 330 330 ella skriva til kundi@banknordik.fo fyri at fáa greið boð um júst tína pensjón**

**www.banknordik.fo**

SENDISTOVAN

# Nýggj lóg um ARBEIÐSSKAÐA TRYGGING



(Løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti arbeiðsskaða)

*Í mai 2009 kom nýggj lóg, ið nevnist Arbeiðsskaðatryggingarlóg.*

*Nýggja lógin dekkar teir arbeiðsskaðar, ið eru hendir aftaná 1.jan.2010, meðan skaðir hendir áðrenn henda dag, verða viðgjørdir eftir gomlu lógini.*

*Henda lóg gevir nógv størri endurgjald um ein kemur til skaða á arbeiðsplássinum, umframt at endurgjøldini eru nógv hægri. Eisini eru lyftiskaðar og vinnusjúkur dekkaðir í nýggju lógina. Dagpeningur verður veittur av Almannastovuni meðan skaðamál verða viðgjørd.*

*Hevur ein fólk í arbeiði, hevur ein skyldu at tekna Arbeiðsskaðatrygging. – Hetta er ásett í lógini. Tryggingarskyldan er galdandi bæði fyri lønt og ólønt arbeiði.*

*Tryggingin dekkar teir skaðar, sum starvsfólk fáa, meðan viðkomandi er til arbeiðis.*

*Tað er skylda hjá arbeiðsgevarum at melda arbeiðsskaðar hjá starvsfólkum til Vanlukkutryggingarráðið – Oyðiblað er at finna á heimasíðuni www.fo.domstol.dk undir „Vanlukkutryggingarráðið."*

## Endamál lógarinnar:

Endamál (grein 1): Endamálið við lógini er at veita endurgjald til persónar, ið koma fyri skaða, ella teirra avvarðandi orsakað av óhappi í sambandi við útinnan av arbeiði.

## Hvat er ein arbeiðsskaði

1. Vanlukkutilburðir, ið standast av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir (ikki á veg til og frá arbeiði)
2. Stutttíðar skaðilig árin, ið vara í mesta lagi 5 dagar, og sum standast av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir
3. Brádliga hendir lyftiskaðar sambært útgreiningini í § 9 og
4. Vinnusjúkur sambært útgreiningini í § 10

## Vinnusjúkur

Í grein 10 er ásett, at:

"Vinnusjúkur eru sjúkur, sum eftir læknafrøðiligum og tøkniligum royndum eru elvdar av serligum árinum, sum ávísir persónsbólkar, orsakað av arbeiði teirra ella viðurskiftunum, arbeitt verður undir, verða ávirkaðir av í størri mun enn persónar uttan tílíkt arbeiði. Harumframt sjúkur, sum livandi fødd børn hava fingið í móðurlívi orsakað av arbeiði, móðirin hevði, ímeðan hon var við barn.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum, hvørjar sjúkur kunnu viðurkennast sum tílíkar vinnusjúkur. Landsstýrismaðurin kann í hesum sambandi áseta, at sjúkur bert eru fevndar av lógini, um tær eru elvdar av arbeiði í ávísum virkisøki, undir ávísum umstøðum, ella aðrar serligar treytir eru loknar.

Stk. 3. Vinnusjúka er eisini aðrar sjúkur, m.a. sjúkur, sum livandi fødd børn hava fingið í móðurlívi, um tað verður prógvað, annaðhvørt at sjúkan eftir nýggjastu læknafrøðiligu royndunum lýkur krøvini um sjúku, sum livandi fødd børn hava fingið í móðurlívi orsakað av arbeiði, móðirin hevði, ímeðan hon var við barn, ella sjúkan bara ella í høvuðsheitum verður hildin at vera elvd orsakað av serligum arbeiðsumhvørvi.

Stk. 4. Sjúkur, elvdar av árinum á foreldrini framman undan gitnaðinum ella eftir føðingina, kunnu við broyting í kunngerðini, nevnd í stk. 2, verða viðurkendar sum vinnusjúkur ella viðurkendar sum vinnusjúkur sambært stk. 3, um tað seinni verður prógvað, at hesi árin á foreldrini hava havt skaðiliga ávirkan á fostrið ella barnið.

Stk. 5. Um ikki annað er ásett í hesi lóg, hava vinnusjúkur rættarvirknað frá tí degi, sjúkan verður fráboðað sambært reglunum í 5. kapitli."

## Tryggingarskylda

Sambært grein 11, so hava allir arbeiðsgevarar (í lógarinnar merking) skyldu at tekna trygging móti arbeiðsskaða fyri øll starvsfólk síni.

## Fráboðan um arbeiðsskaða og fráboðanarfreistir

Hvør skal fráboða : Grein 24 ásetur, at tað er *arbeiðsgevarin* (og landið fyri starvsfólk síni), sum skal fráboða arbeiðsskaða (læknar hava eisini skyldu at fráboða vinnusjúkur). Fráboðanarfreist: sambært grein 23 skal arbeiðsskaði fráboðast skjótast tilber og í seinasta lagi 9 yrkadagar eftir hendingina. Sambært lógini er evsta freist fyri fráboðan vanliga 1 ár. Vanlukkutryggingarráðið kann síggja burtur frá hesari freist, um serligar umstøður gera seg galdandi.

Hvør skal hava fráboðan: Sambært grein 23 er tað Føroya Vanlukkutryggingarráð (dómaraskrivstovan), sum skal hava fráboðanina.

## Hvør viðger tryggingarmálini

Sambært grein 26 er tað Føroya Vanlukkutryggingarráð, sum tekur avgerð í málum um arbeiðsskaða.

Í ráðnum sita dómari, ein lækni og 3 aðrir limir, sum landsstýrið tilnevnir.

## Kærumøguleiki

Avgerðir hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð kunnu sambært grein 35 og 36 kærast til danska *ankestyrelsen* innan 3 mánaðir, eftir at avgerðin er fráboðað løntakaranum.

## Hvat rindar tryggingin fyri

1. útreiðslur til hjálpartól, sjúkuviðgerð o.a.
2. dagpening undir málsviðgerðini (kap 10)
3. endurgjald fyri mist vinnuføri – *minkaður førleiki at forvinna sær løn við arbeiði* - framhaldandi árlig veiting § 50 (kap 11 - § 49 – 80 % av max kr. 367.000 - § 42-javnað § 43)
4. veiting fyri varandi mein – *mein, sum er tengt at persónligu tilveruni eftir skaðan* - vanliga max kr. 611.500 (kap 12- § 57)
5. skiftisveiting til eftirsitandi hjúnafelaga og onnur (*t.v.s. sambúgvi, um tey hava búð saman í 2 ár undan skaðahendingini*) – kr. 150.000 (kap 13)
6. endurgjald til vaksin og børn fyri miss av uppihaldara - *til vaksin 30 % av árslønini og til børn 10 % av árslønini við deyða* - tó max av kr. 367.000 í max 10 ár (kap 14)

## Vinnusjúkugrunnurin

§ 78. Vinnusjúkugrunnurin hevur sum endamál at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur sbrt. § 10.

Stk. 2. Lógarbundnar inntøkur og útreiðslur og avkast av ognarrøkt hjá Vinnusjúkugrunninum verða ikki tiknar við á løgtingsfíggjarlógina. Útreiðslur til umsiting av Vinnusjúkugrunninum verða játtaðar á løgtingsfíggjarlógini og goldnar úr landskassanum. Vinnusjúkugrunnurin endurrindar landinum umsitingarútreiðslurnar

Stk. 3. Innskotið í grunnin er 30 mió. kr. frá landskassanum, at nýta sum tiltakspeningur hjá grunninum sbr. § 80

Stk. 4. Inntøkur grunsins eru gjøld frá arbeiðsgevarum og sjálvstøðugt vinnurekandi sbr. § 79, og sum verða játtaðar grunninum á árligu fíggjarløgtingslógunum. Inntøkur grunsins skulu nýtast til veitingar fyri skaðar, sum eru hendir í árinum, útreiðslur til umsiting, heruppií kostnaði til Vanlukkutryggingarráðið og til avsetingar til tiltakspeningin.

Stk. 5. Landsstýrimaðurin velur nevndina fyri grunnin. Nevndin hevur 3 limir, ein umboðandi arbeiðstakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar, og ein við búskaparligum ella løgfrøðiligum førleika. Starvstíðin hjá nevndini er 4 ár.

Stk. 6. Nevndin ger starvsskipan fyri virksemi sítt. Uppskotið til starvsskipan skal góðkennast av landsstýrismanninum.

Stk. 7. Nevndin setur stjóra at hava dagligu umsitingina av grunninum. Nevndin kann eisini leggja dagligu umsitingina til ein annan almennan stovn.

Stk. 8. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um viðtøkur grunsins.

Stk. 9. Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við grunninum.

## Gjaldið

§ 79. Allir arbeiðsgevarar, heruppií landið og kommunurnar og sjálvstøðugt vinnurekandi, skulu rinda gjald til Vinnsjúkugrunnin.

Stk. 2. Gjaldið, sum arbeiðsgevarar skulu rinda, er 0,10% av útgoldnum A-inntøkum.

Stk. 3. Gjaldið, sum sjálvstøðugt vinnurekandi skulu rinda, er 0,10% av skattskyldugu inntøkuni hjá sjálvstøðugt vinnurekandi sbrt. skattalógini fyri seinasta inntøkuár.

Stk. 4. Hevur arbeiðsgevarin ella tann sjálvstøðugt vinnurekandi ikki goldið tað í stk. 1 nevnda gjald, tá freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Rindar arbeiðstakarin ikki rættstundis, verður gjaldið kravt inn sum írestandi skattur sambært § 78 og § 135 í skattalógini.

Stk. 5. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um innkrevjingina av gjaldinum.

# LEIÐARARÁÐIÐ Á RÁÐSTEVNU

*Bliv en mere effektiv leder – og bliv bedere til at flytte både dig selv og dine medarbejdere*

*Vit vóru í tí hepnu støðu at fáa høvi at luttaka á eini leiðararáðstevnu í Odense.*

Eftir drúgva ferð við seinkan vegna ólag í maskinarínum í flogfarinum komu vit til Odense á miðjari nátt.

Nú var eitt at gera – skunda okkum undir dýnurnar og sova okkum vakrar til næsta morgun.

Dagurin byrjaði við John Andersen og Søren Gunderlach, sum hugleiddu um **„Leiðarin sum ábyrgdari fyri góðsku á stovninum.“** Hetta gjørdu teir út frá eini nøgdsemiskanning, sum teir hava gjørt í Århus kommunu í fjør.

Teir komu inn á týdningin av at delegera uppgávurnar/geva starvsfólki ábyrgd. Teir tosaðu eisini um munin millum leiðslu fyrr og nú.

**Leiðarin fyrr:**

- Kontrollerandi
- Fastar og stirvnar mannagongdir
- Leiðarin tekur avgerðirnar/starvsfólkini útinna uppgávurna
- Kjakast bleiv ikki um uppgávurnar

**Leiðarin nú:**

- Hevur álit
- Broytiligar og smidligar mannagongdir
- Avgerðir verða tiknar og uppávur útintar – í felag
- Vert at kjakast um uppgávurnar

Eftir nøgdsemiskanningina gjørdu teir eina uppfylgjandi kanning, har teir fylgdu teimum stovnum, ið kláraðu seg væl, og teimum, sum kláraðu seg illa í kanningini. Eitt, sum týðiliga kom fram, var, at leiðarin á „há-kvalitets stovninum“ hevði hesi eyðkenni:

- Sær hvat starvsfólkið ger
- Er sjónligur
- Gevur ábyrgd og frælsi
- Setur mál fyri stovnin
- Hugsar her og nú og um framtíðina – har dentur tó verður lagdur á framtíðar visjónir
- Stuðlar hugskotum og virkseminum annars
- Syrgir fyri, at reflektión og afturboðan er ein partur av mentanini
- Heldur fakliga støðið
- Hevur yvirlit í mun til stovnsins virði, visjónir og fakligheit, hóast broytilig viðurskifti

Næsti fyrilestur, ið var hildin av Henrik Larsen, kallaðist **„Soleiðis gerst tú ein meira virkin leiðari.“** Tað, vit allar sita eftir við, var, tá hann tosaði um, hvussu leiðarin kann duga betur **ikki** at átaka sær óneyðugar uppgávur. Hann lýsti hetta við einari apu sum dømi.

Apan er uppgávan, ið starvsfólkið kemur til leiðaran við. Um leiðarin rættir armin út, gongur apan uppá leiðarans herðar og verður sitandi har. Henrik sigur, at leiðarin ístaðin fyri at rætta armin út heldur skal leggja oyra til og lurta eftir, hvussu starvsfólkið ætlar at loysa uppgávuna. Apan verður sostatt sitandi, har hon hoyrir heima.

Apropos apuna, so segði hann eisini, at tá starvsfólk kemur til leiðaran við einum trupulleika, er uppgávan hjá leiðaranum:

- At lurta
- At spyrja seg fram til, hvørja loysn starvsfólkið hugsar um
- At ynskja teimum góða eydnu
- Og leiðarin sigur, at hann gleðir seg at frætta, hvussu leikur fór.

Annemette Digman var næst á skránni, hon hevði ein fyrilestur, sum kallaðist **„Leiðari í broyting.“**

Hon tosaði um hetta við ikki at missa fótafestið í hesi broytingar tíð. Og at tað er týdningarmikið, at leiðarin er strategiskur og dugir at ímynda sær framtíðina.

Annemette kom eisini inn á, at ístaðin fyri at vit hava trongd til at broyta, tá okkurt er áfatt, er tað av stórum týdningi, at vit halda okkum innan fyri teir givnu karmarnar. Hon skýrir enntá leiðaran fyri at hava DOPO-MANI – eina æviga stremban eftir spenningi.

Annemette Digman helt upp á, at leiðarin við síni ævigu stremban eftir spenningi er ábyrgdari fyri 70% av bráðfeingis uppgávunum. Við einum smíli segði hon, at leiðarin sostatt er eldásetari og ikki eldsløkkjari, sum hann jú ofta heldur um seg sjálvan.

Fyrilestrarhaldarin Torkild Olsen tosaði um **„Leiðarin sum samrøðu-felagi.“**

Hann tosaði út frá einum viðurkennandi grundarlag, har hann m.a. kom inn á, at vit síggja ymiskt upp á støðurnar. Torkild Olsen hevði eitt dømi um ein grís, har hann nevndi, at alt eftir, hvar vit eru stødd, síggja vit/hugsa vit ymiskt um grísin: Slaktarin, djóralæknin, barnið, listamaðurin, muslimurin, bóndin o.o. hugsa als ikki tað sama um grísin; og hann sigur, at leiðarin tískil altíð skal vera forvitin og spyrja seg fram, heldur enn at gera egnar niðurstøður.

Í sambandi við hetta segði hann, at tað er týdningarmikið, at leiðarin í samrøðum við síni starvsfólk hevur hesar dygdir:

- Fangar lyklaorð
- Sær, hvat er týdningarmikið fyri starvsfólkið
- Er forvitin (ikki tulkandi)

- Hevur eyguni opin fyri tí, ið eydnast
- Gerst tilvitandi um, hvørjum starvsfólkið strembar eftir
- Lurtar virkin

Seinasti fyrilestrarhaldari, Lola Jensen, umrøddi evni **„Leiðarin í krossøkinum“**. Hon tosaði um støðuna, leiðarin er í, millum fyrisiting, starvsfólk, foreldur og børn – tá hugsað verður um, hvat ið verður væntað av leiðaranum.

Lola var ein frísk dama við nógvum royndum, og hon dugdi væl á ein skemtingarsaman hátt at bera fram tær ymsu týpurnar, ið leiðarin møtir í sínum dagliga arbeiðið:

- Kontrollørurin
- Tann eyðmjúka
- Tann eftirgevandi
- Húsmóður-týpan
- Gyklarin
- Tann troytta
- Tann spenta
- Tann jaliga
- Tann neiliga
- Tann umberandi...

Hon segði, at hetta í sær sjálvum er ein sonn avbjóðing fyri leiðarin. Lola kom eisini inn á týdningin av at kenna felags ábyrgd og ognarskap av stovnsins gongd.

Sjálvt um skráin var á tremur, náddu vit at powershoppa í Odense. Alt gekk við rúkandi ferð, tíðin var knøpp, og posarnir fyltust so við og við, og so brádliga fingu vit eyga á skógvahandilin…!!! Vit skundaðu okkum innar við stjørnum í eygunum og gløðandi gjaldskortum, og eftir bert fáum minuttum høvdu vit fingið alt handilsfólkið at standa við reyvini hægst í holt við at finna okkara støddir og snið, tá inn trein kendur maður úr Odense....! Vit blivu púra paff, og við sjógv á bak, allar út úr handlinum, murrandi „Køb bananer, køb bananer....“ – alt meðan kendi maðurin stóð har og sá beint í reyvarnar á øllum handilsfólkunum, ið enn leitaðu eftir røttu støddunum til okkum. Tssss tssssk… – sóu tit hvør hatta var…??

Alt í alt ein fínur og gevandi túrur. Tað, at vit allar vóru til ráðstevnuna saman, halda vit hevur givið okkum sera nógv sum leiðararáð ☺


# Kjarnutrygging

Kjarnutrygging er til
- *gift*
- *ógift*
- *tey við børnum*
- *tey við serbørnum*
- *fyritøkur*

Kjarnutrygging tryggjar
- *øll sløg av bankaskuld*
- *upp til 1 mió. kr.*
- *skattafrítt útgjald*
- *útgjald uttan um búgvið*

Hugsa nýtt - hugsa tíni - hugsa Kjarnutrygging!

SUÐUROYAR SPARIKASSI

# FELAGSINS AKTIÓNS-
# OG UPPLÝSINGARGRUNNUR:



Elin N. W. Tausennevndarlimur

*Føroya Pedagogfelag hevur ein grunn, nevndan „Aktións- og upplýsingargrunnurin. „Sambært reglugerðini fyri grunnin er endamálið við grunninum" at stuðla limum felagsins undir aktión/verkfalli. Harumframt at granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum."*

## Kunning um aktións- og upplýsingargrunnin.

5% av árliga limagjaldinum til felagið verða sett í grunnin. Inngjaldið skal bert kunna nýtast til at stuðla limum felagsins undir verkfall/aktión, men renturnar av innistandandi peninginum kunnu latast til umsøkjarar, ið vilja granska, styrkja og breiða kunnleika og fatan fyri tí pedagogiska arbeiðinum.

Tað er ein nevnd fyri grunnin, sum avger, hvussu stuðul verður veittur. Sambært reglugerðini fyri grunnin er nevndin mannað við trimum limum, 1 umboð fyri nevndina í Føroya Pedagogfelag og tvey álitisfólk. Seinnu árini hevur eingin nevnd verið fyri grunnin, og tí er eingin stuðul veittur úr grunninum. Hetta kemst óivað eisini av, at grunnurin undir einum verkfalli bleiv tómur, og tað hevur tikið tíð at vaksa um innistandandi í grunninum aftur, so at nakað er at veita stuðul av.

Á einum álitisfólkafundi á vári 2010 legði nevndin fram fyri álitisfólkunum ætlan um at fáa grunnin aftur at virka, sum ætlanin var við honum sambært viðtøkunum. Tað var greiður meiriluti fyri at fáa gongd aftur á grunnin, og tí blivu 2 álitisfólk vald í nenvdina fyri grunnin fyri eitt ár í senn. Rikke Bak Sørensen bleiv vald fyri dagstovnaøkið, meðan Fríða Lómstein bleiv vald fyri serstovnaøkið. Nevndin fyri Føroya Pedagogfelag valdi Jan Mølvad Laursen, og tá hann fór í farloyvi, tók Elin N. W. Tausen við í nevndini fyri grunnin. Á fyrst komandi álitisfólkafundi eftir aðalfundin verður nýtt val millum álitisfólkini til nevndina fyri grunnin.

Tann upphæddin, sum nevndin fyri A&U grunnin hevur møguleika at játta í stuðli um árið, eru renturnar av innistandandi peningi. Nevndin fyri A&U grunnin ynskir at veita stuðul til so nógv sum møguligt, sum kemur undir treytirnar fyri tí, nevndin fyri grunnin hevur heimild til at stuðla.

Í 2010 fekk grunnurin 5 umsóknir, harav 3 fingu játtað stuðul sambært ávísum treytum, sum nevndin fyri grunnin ásetti fyri at veita stuðilin. Nevndin fyri A&U er í gongd við at gera reglugerð fyri, hvussu stuðul verður latin.

## Hvussu og nær er møguligt at søkja úr A&U?

Øll hava møguleika at senda umsókn inn til grunnin. Umsóknin skal verða stílað til „Aktións- og Upplýsingargrunnin". Í umsóknini skal vera nágreinilig frágreiðing um, hvat verður søkt stuðul til, og ein kostnaðarmeting eigur at verða løgd við.

Grunnurin veitir stuðul tvær ferðir um árið, og umsóknir skulu vera nevndini fyri grunnin í hendi fyri 31/5 ella 30/11. Umsøkjarar fáa svar seinast í juni og desember, um man hevur fingið stuðul frá grunninum.

# TALUFRÆLSI OG LIMASKYLDUR



*Maud Wang Hansen*
*forkvinna*

Talufrælsi er ein grundlógartryggjaður mannarættur. Í einum demokratiskum samfelag er talufrælsi krúnan á verkinum. Uttan talufrælsi er einki demokrati. Ein kann spyrja, hvat vit skulu við hesum talufrælsinum, um eingin hevur hug at siga nakað? Kanska er tað gott, at møguleikin kortini er har, tí um tú hevur hug at siga okkurt, so ger tað, men ger tað við umhugsni. Talufrælsi kann eisini verða at tala fyri onnur, sum ikki sjálvi hava eina rødd.

Grein 19 í ST mannarættindasáttmálanum: *Øll skulu vera fræls at hava sínar áskoðanir og bera tær fram uttan forðan, og at søkja sær og breiða út vitan og hugsanir ígjøgnum hvønn boðmiðil, sum vera skal, og óheft av landamarki.*

Talan er tí um at eitt hvørt menniskja og eitthvørt starvsfólk hevur rætt til at úttala seg, siga sína hugsan um egin viðurskfti og at siga sína hugsan um onnur viðurskifti uttan so, at talan er um brot á tagnaðarlyftið, sum kann tyngja aðrar persónar á nakran hátt. Tagnarskylda er ikki tað sama sum ikki at hava rætt til at úttala seg. Tað tykist løgið, at vit í hesum Pedagogblað í 2011 aftur mugu varpa ljós á tey grundleggjandi mannarættindini, sum allir limir í Føroya Pedagogfelag hava vunnið sær sum heimsborgarar – nevniliga talufrælsi.

At starvast hjá tí almenna setur stór krøv til starvsfólk, tí talan er tá ikki um privat viðurskifti, men um almenn viðurskifti. Starvsfólk hava skyldu til at verða talsfólk hjá børnum og ungum og hjá fólki við skerdum førleika, sum tey starvast við. Tú hevur sum starvsfólk skyldu til at boða frá, um onnur eru fyri órætti av einum hvørjum slag – fráboðanarskyldan. Tað sama ger seg galdandi, um starvsfólk uppliva viðurskifti, sum ikki eru í tráð við lógir, reglur og sáttmálaásetingar.

Eingin arbeiðsgevari kann áleggja sínum starvsfólkum ikki at úttala seg um viðurskifti sum viðvíkja starvinum ella persóninum sjálvum. Eingin arbeiðsgevari kann heldur forða einum limi í at fara til sítt fakfelag við viðurskiftum, sum hava við tey sjálv at gera ella sum eru beinleiðis brot á sáttmálar og lógir. Tað er ein trupulleiki fyri eitt demokratiskt samfelag, at ávísir samfelagsbólkar halda seg hava minni rætt til talufrælsi enn onnur. Tað er umráðandi, at starvsfólk vita, hvat tey ikki hava rætt til at úttala seg um, um talan er um vanliga tagnarskyldu ella um víðkaða tagnarskyldu. Annars eigur eingin at leggja haft á starvsfólk ella at tilskila teimum serlig skerd rættindi.

Eg upplivi, at fleiri limir, sum venda sær til felagið, vilja verða dulnevndir, ella at limir siga frá viðurskiftum, sum ikki eru í lagi. Alt ov ofta ynskja limir ikki, at felagið skal gera nakað við hesi viðurskifti, um tað kemur fram, hvør hevur boðað felagnum frá. Limir siga, at tey eru bangin fyri at blíva svartlistað ella at koma í ringt ljós hjá arbeiðsgevara, um tey siga sína hugsan. Hetta er serliga tyngjandi fyri starvsfólk, nú sparingar og uppsagnir eru gerandiskostur. Tað er skelkandi at uppliva, at hetta er nakað sum endurtekur seg, og at limir við stórari rættvísiskenlsu kenna seg tyngd og í tvístøðu av teirri einfaldu orðsøk, at tey hava hildið sínar skyldur.

Tað skal tí vera mín vón, at allir limir framyvir gera vart við sína hugsan og boða frá viðurskiftum, sum eru skeiv ella tyngjandi og boða frá vánaligari viðferð av einum hvørjum slag. Vendið tykkum til felagið ella til rætta viðkomandi, sum hevur ábyrgd av ella sum kann hjálpa við at loysa trupulleikan. Tað er eisini mín vón, at starvsfólk framyvir brúka møguleikan fyri at tosa um síni starvsviðurskifti og aktivt luttaka í almenna kjakinum.

## TIGA ELLA TALA



Spurningurin nær starvsfólk eiga at tiga ella tala, er framvegis háaktuellur. Summa staðni er tað bert stjórin, sum úttalar seg, meðan starvsfólk annars tiga. Mangan frættist um, at starvsfólk bera ótta fyri avleiðingum, um tey siga sína meining um eitt ella annað á arbeiðsplássinum.

Pedagogblaðið hevur áður viðgjørt hendan spurning, men av tí at hann er líka viðkomandi í dag, fara vit at endurgeva nakað av tí, sum Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, og Sólja í Ólavstovu, løgtingsins umboðsmaður, søgdu við Pedagogblaðið fyri umleið trimum árum síðani.

# IKKI BERT STJÓRAR EIGA AT ÚTTALA SEG



*Marjun Hanusardóttir løgmansstjóri*

*Látu stjórar eisini onnur starvsfólk úttala seg um sítt arbeiðsøki, styrkti tað eisini um sjálvsvirðið hjá starvsfólkunum, og tey fingu kanska eisini størri dirvi til at verða við í samfelagskjakinum, heldur løgmansstjórin*

Tað er ikki meira enn at tað kemur fyri á almennum stovnum, at onnur enn stjórar úttala seg um viðurskiftini á stovninum

## Rætt at úttala seg

Marjun Hanusardóttir er løgmansstjóri. Pedagogblaðið hitti hana og spurdi hana fyrst, hvat hon leggur í hugtakið tagnarskylda, og nær almenn starvsfólk kunnu úttala seg.

Alment sett starvsfólk hava í ávísum viðurskiftum lógarfesta tagnarskyldu. Og hana mugu tey treytaleyst halda seg til. Men tagnarskylda er á lutfalsliga sera fáum økjum, og hon er fyrst og fremst til at verja persónsupplýsingar.

Tá ið tað snýr seg um at úttala seg vegna sítt almenna arbeiðspláss, er tað leiðslan, ið kann gera av, hvør kann úttala seg. Men ein leiðsla kann ikki avgera, hvat tað einstaka starvsfólkið kann úttala seg um vegna seg sjálvt, tí starvsfólk hava altíð rætt at úttala seg sína egnu vegna, so leingi tey ikki bróta tagnarskylduna; eisini tá tað snýr seg um viðurskifti, sum hava við stovnin at gera.

I allar flestu førum er tað tí ikki rætt at nýta tagnarskylduna sum grundgeving fyri, at fólk ikki vilja úttala seg egna vegna.

Hinvegin er veruligi møguleikin at nýta sítt talufrælsi meira og meira skerdur, jú nærri tey sita at avgerðunum, tí tey mugu taka atlit at teirra loyalitetsskyldu mótvegis politisku ella fyrisitingarligu leiðsluni. Hetta er serliga galdandi í miðfyrisitingini fyri tey, sum sita tætt at politiska valdinum, har avgerðir verða tiknar, og harvið eisini nær teimum tilgongdum, sum føra til avgerðirnar. Vit mugu ásanna, at tað kemur sjáldan fyri, at starvsfólk úttala seg, hóast tey hava fullan rætt til tess. Hví so er, heldur løgmansstjórin kann vera, at fólk á ein ella annan hátt kenna seg ótrygg mótvegis arbeiðsgevaranum, hóast tey onga orsøk áttu at havt til tess. Hon heldur, at stjórar í nógv størri mun áttu at latið starvsfólk úttala seg um teirra arbeiðsøki. Tað hevði eisini givið fólki størri dirvi at vera við í almenna kjakinum. Um starvsfólk hava hug at úttala seg, avgera tey sjálvandi sjálv. Hetta er ein rættur tey hava, og ikki ein skylda.

– Eg haldi, at tað er umráðandi, at stjórar gera starvsfólki sínum púra greitt, at tey eru vælkomin at úttala seg. Í øllum førum mugu teir tryggja, at starvsfólk kenna seg væl, tá ið tey hava sagt t.d. fjølmiðlum sína hugsan. Eg sigi ikki, at leiðarar ikki gera tað, men ein kann spyrja seg sjálvan, hví tey eru so fá, sum úttala seg frá almennum stovnum, sigur Marjun Hanusardóttir og sipar her bæði til miðfyrisitingina og aðrar almennar stovnar.

## Felags fatan av opinleika

Almennu Føroyar hava ongan felags kunningarpolitikk, og tað heldur stjórin á løgmansskrivstovuni vera spell, tí tað kundi hjálpt til at fingið ein meira opnan hugburð á mongum økjum. At gera ein felags kunningarpolitikk kundi verið ein góð felags verkætlan millum ymisku leiðslurnar og kunningarkøn fólk, har mongu viðurskiftini, sum hava við kunning at gera, verða lýst og umrødd, so at komið verður til eina felags fatan og hugburð av kunning í breiðastu merking. Tað verið seg, tá tað snýr seg um talufrælsi hjá hinum einstaka ella hvussu fólk úttala seg vegna viðkomandi stovn, og tað kann eisini vera ymiskt frá stovni til stovn. Ein spurningur er eisini í sambandi við alment innlit, og hvønn hugburð fólk hava til hesa skipan. Sjálvandi skulu øll halda lógina, men hugburðurin til enn meira innlit er helst ymiskur millum fólk, m.a. spurningurin um opnar postlistar, sigur Marjun Hanusardóttir. Stóra spurningin heldur Marjun vera, hvussu samfelagið kann gerast enn meira opið, meðan vit samstundis tryggja okkum, at tað, sum skal vera innanveggja, verður har, og tað hevði eisini fingið starvsfólk at kent seg meira frí og greið yvir, hvussu opin tey kunnu vera. Harvið fáa tey høvi til at brúka sítt talufrælsi; og stjórarnir verða tilvitaðir um, at starvsfólk skulu hava hetta frælsi.

## Flytur hugburð

Ein stórur partur av almennu skipanini eru kommunurnar. Tær hava sítt sjálvstýri, og teimum er ikki álagt at halda almennar leiðreglur eitt nú um starvsfólkapolitikk. Kann landsstýrið á nakran hátt gera sína ávirkan galdandi í so máta mótvegis kommununum, sum viðgera starvsfólkamál á sera ymiskan hátt?

– Kommunurnar eru bundnar av fyrisitingarlógini, og tað eru reglur í hesi lóg, ið stundum ikki verða hildnar til fulnar í starvsfólkamálum. Hetta kenna vit m.a. til í sambandi við átalur frá Løgtingsins Umboðsmanni.

Tað hevur sjálvandi týdning, at fyrisitingarnar hava reglur at halda seg til. Men tá tað er sagt, leggi eg nógv størri dent á hugburðin hjá teimum leiðandi innan land og kommunur. Ger t.d. landið nakrar leiðreglur, sum verða væl og virðiliga viðgjørdar av fólki, bæði hjá landi og kommunum, so eri eg sannførd um, at ein tílík tilgongd eisini flytur mørk og hugburð. Tað er eftir mínum tykki tað sterkasta kortið. Sjálvandi stendur tað kommununum frítt, um tær taka landsins leiðreglur til sín, men tað hava tær við tíðini gjørt í stóran mun, sigur Marjun Hanusardóttir. Hon vísir á almenna

starvsfólkapolitikkin, sum fleiri kommunur hava tikið til sín.

Løgmansstjórin leggur dent á, at tað er týdningarmikið, at fólk hava ein felags hugburð. At tey kenna á sær, at vit fáa nakrar leiðbeinandi reglur, sum kunnu verða øllum til hjálpar, heldur enn at fólk fata tílíkar leiðreglur sum eitt haft, og at øll eru samd um týdningin av opinleika, soleiðis at fólk kenna seg trygg og væl kunnað um tað, sum er í umbúna, og tað, sum fer fram.

---

# KUNNU ÚTTALA SEG EGNA VEGNA



*Sólja í Ólavstovu løgtingsins umboðsmaður*

*Løgtingsins Umboðsmaður hevði gjørt vart við, at Fólkatingsins Umboðsmaður og dómstólarnir hava sligið fast, at alment sett starvsfólk hava rætt til at finnast at. Eisini alment, um teirra arbeiðsumstøður ella tað virksemi, tey fáast við, verður hildið at vera óforsvarligt.*

Sólja í Ólavstovu leggur dent á, at nakrar avmarkingar eru í talufrælsinum, sum skal virðast, og at ærumeiðandi úttalilsi, órímiliga grovar viðmerkingar, ella við vilja at geva upp skeivar upplýsingar, fella uttanfyri talufrælsi. Umboðsmaðurin leggur aftrat, at tað eru nøkur alment sett starvsfólk, sum hava skert talufrælsi. Hesi eru tey, sum sita nærmast eitt nú aðalstjórum og deildarleiðarum, har avgerðir verða tiknar. Sólja í Ólavstovu slær tó fast, at ein vanlig misskiljing er, at alment sett vilja ikki úttala seg, tí at stjórin hevur tilskilað sær rættin at úttala seg fyri stovnin. Hon sigur, at tað hevur stjórin eisini sín fulla rætt til, men hann kann ikki forða starvsfólki í at úttala seg egna vegna. Hetta vil siga, at øll starvsfólk hava talufrælsi, eisini um viðurskifti á arbeiðsplássinum hjá sær, so leingi tey sjónliga gera vart við, at útsøgnin er teirra vegna, sigur Løgtingsins Umboðsmaður.



# AT RÚMAST Á ARBEIÐSMARKNAÐINUM



*Maud Wang Hansen*
*forkvinna*

## Hóttandi arbeiðsloysi

Flestu okkara, sum hava eitt fast starv, eru fegin um tað. Vit vita jú, at tað er eingin sjálvfylgja at hava eitt starv longur. Nógv fólk í føroyska samfelagnum eru í løtuni rakt ógvuliga hart av arbeiðsloysi og hóttandi ætlanum um uppsøgn vegna sparingar og ringar fíggjarvánir.

Sparingar eru ein hóttan móti øllum, sum í løtuni hava eitt starv, tí hvør veit, um tað verður tín túrur?

Tá ein hóttan um uppsøgn ella niðurskurð í starvstíð er væntandi, er tað torført at tora at vera, sum ein altíð plagar at vera. Tað verður av summum umhugsað gjølla, áðrenn ein sigur sína hugsan um hetta og hitt, tí kanska kann tað fáa avleiðingar, um ein hevur eina hugsan, sum gongur ímóti leiðsluni ella arbeiðsgevaranum. Kanska gongur tað út yvir meg næstu ferð! Hetta eru ikki serliga stuttligir tankar at hava hvønn dag, ein fer til arbeiðis. Kanska torir tú ikki at gerast sjúk ella hava krím, tí hvør veit, um tað kann fáa avleiðingar fyri tína starvssetan. Hugsa tær, at ivi verður sáddur um, hvørt tú nú ert stabil ella ikki. Tíverri er hetta nakað, vit hoyra oftani frá limum.

## Symbolikkur

Eitt listaverk bleiv reist í Hoyvíkstjørn stutt fyri jól. Listaverkið er ein keta, sum reisir seg upp í luftina, og ovast er ein ringur við einum samanringdum og naknum mannakroppi í.

Ein keta symboliserar nakað sterkt, ein keta skal halda saman upp á okkurt og fora fyri, at tað kann slíta seg leyst. Ein keta er ikki sterkari enn veikasta liðið. Nakni mannakroppurin ovast í listaverkinum situr samanringdur og hevur ógvuliga lítið pláss. Tað er, sum roynir hann at passa inn í eitt umhvørvi, har einki pláss er.

Hetta listaverk fekk meg at hugsa djúpt um ta støðu, sum nógv starvsfólk eru í í løtuni. Vit hava sæð uppsagnir av starvsfólki vegna sparingar á starvsøkinum, bæði hjá landi og kommunum. Hetta er ikki óvanligt, tá ræðusøgur um fíggjarkreppu eru dagligur kostur í tíðindasendingum. Hinvegin er tað heldur ikki óvanligt, at fólk verða søgd úr starvi vegna bygnaðarbroytingar. Tað, eg vil varpa ljós á í hesi grein, er, at líkamikið, hvat orsøkin er til, at eitt starvsfólk verður sagt úr starvi, so eigur hetta at verða gjørt við virðing fyri starvsfólkinum fyrst og fremst, umframt at sáttmálaásetingar og reglur eiga at verða fylgdar.

## Ongum er tryggjað eitt arbeiði

Allir limir í Føroya Pedagogfelag hava eina trygging, sum tryggjar ein við ávísa hættisliga sjúku. Vanlukkutilburðir eru umfataðir av arbeiðs- og umhvørvislógini. Tó er eingin trygging ella vissa fyri, at tú varðveitir títt tilknýti til arbeiðsmarknaðin, um tú ert fyri sjúku ella vanlukku, sum ávirkar tín arbeiðsførleika. 120 daga reglan, sum var ein ætlan um at skipa viðurskiftini viðvíkjandi langari sjúkrafráveru, verður í dag av fleiri arbeiðsgevarum brúkt til at siga fólki upp við styttri freist enn vanligt. Ætlanirnar við skipanini um at hava eina samrøðu við starvsfólkið, at tosa um útlitini fyri framtíðina og at finna møguligar proportionalar møguleikar verða ikki fylgdar. Tað hava vit fleiri dømi um í Føroya Pedagogfelag. Vit síggja dugnaligar námsfrøðingar missa sítt arbeiði og tilknýti til arbeiðsmarknaðin vegna sjúku, vanlukkutilburð ella bygnaðarbroytingar. Talan er ikki um starvsfólk, sum eru mett at vera invaliderað; so langt er viðgerðin ikki komin, tá ein uppsøgn longu liggur á borðinum. Proportionalitetsprinsippið verður ikki fylgt í tann mun, tað átti at verið fylgt – starvsfólk fáa beinleiðis at vita, at tey sjálv hava skrivað undir 120 daga regluna, og hetta loyvir arbeiðsgevara at siga tey úr starvi við bert einum mánaðar freist. Tað eru leiðarar á dag- og serstovnum, sum eru sinnaðir at finna aðrar tillagaðar møguleikar fyri starvsfólk, sum eru vorðin førleikaskerd av ávísari orsøk. Tó vilja ovaru leiðslur ella myndugleikar ikki góðtaka eina loysn, sum kostar pengar, óansæð um hetta bert er í eina tíð ella framyvir. Trygdin fyri at varðveita sítt tilknýti til arbeiðsmarknaðin er skerd, og uttan at hugsa um tað, verða starvsfólk rend út í arbeiðsloysi og klientgering. Avleiðingin av at missa arbeiði er at søkja um eitt vart starv ella at gerast almannaklientur við forsorgarhjálp.

Tað er ørkymlandi, at førleikin hjá dugnaligum starvsfólkum verður yvirsæddur og ikki virðismettur, og at dentur verður lagdur á tann skerda lutin. Virðið fyri einstaka starvsfólkið í at hava eitt ávíst tilknýti til arbeiðsmarknaðin er torført at gera upp í pengum, men tað gerst sambært einari spurnakanning frá 2007 púra greitt, at tað at missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin fyri mong er tað tyngsta við at gerast førleikaskerd/ur.

Tað, sum stendur eftir, tá uppsagnir verða framdar, er, at arbeiðstrýstið veksur á stovnunum, og tey, sum eru eftir, mugu renna skjótari og hava torført við at náa alt. Um tey eru sjúk og heima frá arbeiði, er hetta við ringum tannabiti, tí tey vita, hvussu tungt tað er hjá teimum, sum eru til arbeiðis og mugu átaka sær teirra uppgávur afturat sínum egnu. Trýstið í arbeiðsdegnum kann elva til strongd og vánaligt sálarligt arbeiðsumhvørvi. Fyri summi førir hetta við sær langar sjúkralegur, og starvsfólk koma í vanda fyri at missa sítt starv vegna sjúku. Summir arbeiðsgevarar brúka 120 daga regluna sum eitt amboð fyri at siga fólk úr starvi við styttri uppsagnarfreist enn annars – aðrir arbeiðsgevarar bjóða





starvsfólkinum eina samrøðu fyri at finna út av, hvat kann gerast fyri at betra um støðuna. Tað verður kannað, hvørji útlitini eru fyri, at starvsfólkið kann koma aftur til arbeiðis, ella um møguleiki er fyri at broyta starvssetanina soleiðis, at viðkomandi kann røkja aðrar uppgávur í eina tíð, ella um viðkomandi kann fáa broytta arbeiðstíð. Hetta eru bert dømir um, hvørji tiltøk kunnu setast í verk fyri at tryggja starvsfólkinum tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Tað er sera álvarsligt at koyra fólk út í arbeiðsloysi, tí tað at hava eitt arbeiði snýr seg um so nógv annað enn at vinna pening.

## Arbeiðsumhvørvi og vanlukkur

Ein annar trupulleiki, sum kann standast av strongdum arbeiðsumhvørvi og undirnormeringum, eru arbeiðsvanlukkur. Tað eru tíverri fleiri tilburðir av arbeiðsvanlukkum, sum fáa álvarsligar fylgjur fyri sarvsfólk í styttri ella longri tíð. Tað kemst nokk ongantíð undan arbeiðsvanlukkum, men eitt er púra greitt, at tá eitt starvsfólk er fyri einari vanlukku á arbeiðinum, mugu heilt serlig atlit takast til hesi fólk. Sum tað fyrsta skulu allir tilburðir meldast til vanlukkuráðið – óansæð, hví tilburðurin hendi. Tað er ikki arbeiðsgevarin, sum skal taka støðu til, hvørt ein tilburður er góðkendur sum arbeiðsskaði ella ikki. Umráðandi er heldur at melda skaðar ov ofta enn ov sjáldan. Tað, leiðslan og arbeiðsgevarin skulu tryggja sær, er, at øll skjøl verða fylt út, og fráboðan send um tilburðin. Harafturat má arbeiðsgevarin hava áhuga í at fylgja við, hvussu starvsfólkið hevur tað og veita supervisjón ella aðra stuðlandi hjálp í tíðini eftir tilburðin.

Um skaðin er so álvarsligur, at starvsfólkið ikki er ført fyri at røkja sítt starv, mugu somu atlit takast, sum tá fólk gerast sjúk. Tað er eingin ivi í mínum sinni um, at tann seinasta avgerðin, ið verður tikin, er avgerðin um siga fólk út starvi.

## At síggja møguleikar heldur enn forðingar

Proportionalitetsprinsippið ásetur, at arbeiðsgevarin hevur skyldu til at finna eina loysn, sum gevur starvsfólki møguleika fyri at varðveita sítt tilknýti til arbeiðsplássið ella til eitt annað arbeiðspláss – møguliga við tillagaðum arbeiðsuppgávum. Júst tað sama er galdandi, tá ið bygnaðarbroytingar fara fram. Broytingarnar mugu ikki hava størri avleiðingar fyri starvsfólk enn neyðugt, og tað skal kunna prógvast, hvat veruliga verður gjørt fyri at skapa arbeiðsmøguleikar fyri starvsfólkini.

Líkheitsprinsippið verður ikki altíð fylgt, tá starvsfólk antin gerast sjúk, koma út fyri vanlukkutilburði, ella tá bygnaðarbroytingar fara fram. Viðhvørt síggja vit, at tað letur seg væl gera at fylgja teimum ásetingum, sum eru viðvíkjandi proportionaliteti. Aðrar tíðir síggja vit, at starvsfólk kunnu verða sjúk leingi og koma aftur, tá tey eru frísk – meðan onnur missa sítt arbeiði eftir 120 dagar, uttan at nøkur samrøða er farin fram um møgulig útlit ella um møguleikan fyri at røkja aðrar uppgávur. Tá eru øll starvsfólk ikki viðfarin líka, og tað er átaluvert.

<u>ST–sáttmálin verjir starvsfólk, sum bera brek, harundir starvsfólk, sum missa arbeiðsførleika vegna sjúku ella vanlukkutilburð</u>

**ST-sáttmálin fyri fólk, sum bera brek**
**Grein 27 - Arbeiði og starvssetan**

1. Limalondini viðurkenna rættin hjá fólki, sum bera brek, at arbeiða á jøvnum føti við onnur; tað fevnir eisini um rættin at vinna til lívsins uppihald við arbeiði, sum valt er av fríum vilja ella góðtikið á arbeiðsmarknaði og arbeiðsumhvørvi, sum er opið, sum tekur øll uppí og loyvir fólkum, ið bera brek, framat. Limalondini skulu verja og virka fyri, at rætturin til arbeiði verður framdur, eisini hjá teimum, sum fáa brek í sínum arbeiði, við at taka hóskandi stig, eisini gjøgnum lóggávu, til millum annað, at:

**a.** banna mismun vegna brek í sambandi við øll mál, sum viðvíkja arbeiði, eisini treytir í sambandi við at útvega fólk, starvssetan og arbeiði, framhald í arbeiði, framflyting í arbeiði og trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskifti.

**b.** verja rættin hjá fólki, sum bera brek, til - á jøvnum føti við onnur – rættvís og gagnlig arbeiðsviðurskifti, harímillum javnbjóðis møguleikar og somu løn fyri arbeiði við sama virði, trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskifti, harímillum verju fyri happing og uppreisn fyri vanbýti.

**c.** tryggja, at fólk, ið bera brek, eru før fyri at gagnnýta síni arbeiðs- og fakfelagsrættindi á jøvnum føti við onnur.

**d.** geva fólki, sum bera brek, møguleika at hava veruliga atgongd til almenna, tøkniliga og vinnuliga lærlingaútbúgving, starvsvenjingartilboð og vinnu- og framhaldsútbúgving.

**e.** virka fyri starvsmøguleikum og framflyting í arbeiði fyri fólk, ið bera brek, á arbeiðsmarknaðinum og hjálpa teimum at finna, útvega sær, halda fast um og venda aftur til arbeiði.

**f.** virka fyri møguleikum til sjálvstøðugt vinnuvirksemi, ígongdsetaravirksemi, at menna samvinnufeløg og at fara undir egið virki.

**g.** seta fólk, ið bera brek, í alment starv.

**h.** virka fyri, at fólk, ið bera brek, verða sett í starv í privatum virkjum gjøgnum hóskandi politiskar ætlanir og tiltøk, sum kunnu vera skipaður fyrimunur, tileggjan og onnur tiltøk.

**i.** tryggja, at hampiligar umstøður verða veittar fólki, ið bera brek, á arbeiðsplássinum.

**j.** virka fyri, at fólk, ið bera brek, fáa royndir á tí opna arbeiðsmarknaðinum.

**k.** virka fyri, at fólk, ið bera brek, fáa endurmenning í síni vinnu ella yrki, fáa varðveitt sítt arbeiði og fáa skeið til tess at kunna sleppa aftur í arbeiði.

## Sáttmálasamráðingar og rúmligi arbeiðsmarknaðurin

Til sáttmálasamráðingarnar fekk Fakfelagssamstarvið ein fyrispurning frá Ráðnum fyri brekað um at fáa ein orðing um rúmliga arbeiðsmarknaðin inn í sáttmálarnar. Vit gjørdu eina ítøkiliga roynd fyri at fáa eina orðing ella í minsta lagi eina álitisváttan inn í sáttmálarnar, soleiðis sum okkurt felag á privata arbeiðsmarknaðinum hevur gjørt. Tað var okkara vón at fáa ein tekst lagdan inn í okkara sáttmálar, sum vísti á, at bæði fakfeløg og arbeiðsgevarar vilja fremja rúmliga arbeiðsmarknaðin í verki.

*Tað er ein politiskur trupulleiki, at arbeiðsgevarar ikki longur fáa veitt endurgjald fyri sjúku, og tað setur okkara limir í sera truplar støður, tá okkurt óvæntað hendir.*

Tað bleiv brúkt tíð uppá at viðgera og umrøða viðurskiftini á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum vit síggja tey í dag. Fakfelagssamstarvið heldur tað verða neyðugt við ásetingum í sáttmálunum fyri at tryggja fólki við skerdum arbeiðsførleika at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin. Vit meta, at tað er skilabetri at hava eitt avmarkað ella tillagað tilknýti til eitt arbeiðspláss, heldur enn at verða koyrd úr arbeiði og harvið klientgjørd.

Í Føroyum eins og í hinum Norðurlondunum eru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum við ásetingum í sínámillum sáttmálum skipa viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum.

Í einum vælskipaðum samfelag eiga allir borgarar at hava møguleika at átaka sær arbeiðsuppgávur, sum liggja innan fyri teirra førleikakarm. Tí eru partarnir samdir um, at positivt viðgera og skapa arbeiðsmøguleikar fyri starvsfólk við skerdum arbeiðsførleika. Talan er um starvsfólk, sum vegna sjúku ella vanlukku missa arbeiðsførleika. Hetta kann m.a. gerast soleiðis at hesi starvsfólk fáa serliga tillagaðar setanartreytir. Við støði í vanligu ásetingunum í sáttmálunum eigur sostatt at bera til at lata arbeiði vera gjørt undir serligum treytum.

Øllum verður tryggjað eitt virkið arbeiðslív, og eingin skal vera fyri mismuni á arbeiðsmarknaðinum vegna skerdan arbeiðsførleika. At skapa rúm fyri fólki við skerdum arbeiðsførleika er gagnligt fyri viðkomandi fólk, arbeiðspláss og samfelagið sum heild.

Hetta uppskot vann tíverri ikki frama. Arbeiðsgevarin helt, at tað var óneyðugt at fáa slíka orðing í sáttmálarnar, tí tað bindur arbeiðsgevaran til nakað, sum tey ikki eru áhugað í. Arbeiðsgevarin helt somuleiðis, at viðurskiftini eru góð, og at omanfyri nevndu starvsfólk eru væl vard.

## Politiska ábyrgdin

Tað er ein politiskur trupulleiki, at arbeiðsgevarar ikki longur fáa veitt endurgjald fyri sjúku, og tað setur okkara limir í sera truplar støður, tá okkurt óvæntað hendir. Heitt verður tí á arbeiðsgevarar um at verja síni starvsfólk sambært galdandi reglum og ásetingum og ongantíð at velja uppsøgn, fyrr enn alt annað er roynt. Somuleiðis heiti eg á arbeiðsgevarar um at taka ábyrgdina av tílíkum uppsagnarmálum og handfara tey í størsta álvara og hugsa um, at á námsfrøðiliga starvsøkinum eru starvsfólk og leiðarar starvsfelagar í størri mun enn aðrastaðni. Hugsast skal um, at fólk við góðari útbúgving missa sítt tilknýti til arbeiðsmarknaðin, hóast stórur tørvur er á útbúnum fólki, og tað sigur seg sjálvt, at tað er ikki gott fyri nakran. Um tænastustøðið skal verða høgt, er tørvur á einum inkluderandi hugburði heldur enn einum hugburði, sum óneyðugt sáldar summi frá. Í síðsta enda er tað landskassin, sum skal gjalda, tá starvsfólk missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin – tað kann væl ikki hugsast, at nakar ger sær dælt av tí?

# ARBEIÐSMARKNAÐURIN SKAL GERAST ENN RÚMLIGARI



*Leif Olsen*
*fulltrúi á Almannastovuni*

*Sum liður í arbeiðinum at endurskoða sosialu arbeiðsmarknaðarskipanirnar í forsorgarlógini er Almannamálaráðið farið undir at gera greiðari reglur fyri vard størv og endurbúgving. Við hesum verður roynt at gera arbeiðsmarknaðin enn meira rúmligan*

Í mong ár hava vit havt skipanir í sambandi við endurbúgving og vard størv. Almannastovan umsitur í dag skipanir, sum eitt nú hava við endurbúgving og vard størv at gera. Skipanirnar eru fyri fólk, sum hava verið fyri onkrari hending, ið hevur skert teirra arbeiðsføri soleiðis, at tey ikki longur kunnu forsyrgja sær í verandi starvi ella á arbeiðsmarknaðinum yvirhøvur. Lúka fólk treytirnar fyri at koma undir endurbúgvingarskipan, kann Almannastovan geva hesum fólkum okkurt tilboð, soleiðis at hesi fáa ein møguleika aftur at koma á arbeiðsmarknaðin.

Skipanin við vardum starvi er fyri tey, sum ikki hava fullan arbeiðsførleika, men framvegis kunnu vera á arbneiðsmarknaðinum. Skipanin ber í sær, at arbeiðsgevarin fær endurrindað part av lønini til viðkomandi.

Hesar skipanir sigur forsorgarlógin ikki nógv um. Bert nakrar heilt fáar reglur, og tí heldur Almannastovan seg meira til praksis enn lógartekst. Almannaráðið arbeiðir nú við at gera greiðari lógarreglur á økinum.

## Rúmligi arbeiðsmarknaðurin

Leif Olsen, sum umboðar Almannastovuna, var tí ein av fyrireikarunum til eina ráðstevnu, sum var herfyri, og sum snúi seg um breiða hugtakið, rúmligi arbeiðsmarknaðurin.

Leif Olsen greiðir frá, at skipanin við vardum størvum er ikki galdandi aðrastaðni enn í Føroyum og Danmark. Skipanin er undir stórum trýsti og verður av mongum hildin at vera í so hjálpsom, bæði fyri viðkomandi, sum er í skipanini, og arbeiðsgevaran. Serliga av teirri orsøk, at er ein komin í hesa skipan, er lítið, sum eggjar til at koma úr henni aftur. Gerst ein í skipanini betur fyri aftur og tí kann átaka sær ein størri lut í lønandi arbeiði, er lítil orsøk til tess, tí samlaða lønin verður hin sama. Almannastovan rindar framvegis munin. Og fyri arbeiðsgevaran er hetta framvegis ein lagalig skipan.

## Arbeiðsmarknaðurin skal við

Tí verða eisini aðrir møguleikar umhugsaðir, soleiðis at partarnir á arbeiðsmarknaðinum í fyrsta lagi umhugsa hóskandi broytt starvsinnihald, heldur enn at viðkomandi fer beinleiðis undir eina sosiala skipan.

Leif Olsen sigur, at um rúmligi arbeiðsmarknaðurin skal fáa veruligt innihald, so er neyðugt, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir gera skipanir, eitt nú avtalaðir í sáttmálum, og vísir á, at í onkrum sáttmála stendur, at arbeiðast skal fyri tí rúmliga arbeiðsmarknaðinum, uttan tó at stórt meira verður sagt. Men hetta krevur, at allir partar, privati sum almenni arbeiðsmarknaðurin, saman við politisku skipanini, finna loysnir, so fólk við skerdum arbeiðsførleika framhaldandi kunnu vera á arbeiðsmarknaðinum.

Høvuðssjónarmiðið er, at sosiala lóggávan tekur sær av einum parti, men skal veruliga vera talan um rúmliga arbeiðsmarknaðin, eiga eisini onnur at vera við, eisini arbeiðsgevarin, sigur Leif Olsen.



*Skipanin við vardum starvi gav Daysi møguleika til at luttaka í arbeiðslívinum saman við sínum starvsfeløgum, og tað er hon sera fegin um*

# DAYSI ER Í VARDUM STARVI

# GOTT AT SLEPPA TIL ARBEIÐIS

*– At hava møguleika at koma til arbeiðis, og harvið vera ein virkin partur í samfelagnum, dámar mær ótrúliga væl, hóast førleikin er avmarkaður, sigur Daysi Jóanesarson*

Daysi er úr Honduras og búsettist í Føroyum fyri 19 árum síðani. Í heimlandinum hevði hon lisið sálarfrøði, og starvaðist á stovni fyri spastisk børn. At arbeiða við børnum dámdi henni væl, og tí var natúrligt at royna at fáa sær eitt tílíkt arbeiði í Føroyum. Tað eydnaðist, og hon fekk starv á Dagstovninum á Argjum, har hon hevur verið í 15 ár. Fyrst sum avloysari, men kom síðani í fast starv. Soleiðis arbeiddi hon í fleiri ár, til sjúka so smátt fór at avmarka hennara likamsligu styrki.

– Sjúkan hevði eisini pínu við sær, og eg fór til lækna. Tað vísti seg at talan var um eina ógvuliga sjáldsama sjúku, sum ikki var stórvegis kunnleiki til, men so mikið fekk eg at vita, at eg fekk neyvan fullan førleika aftur, men møguleiki var fyri, at sjúkan ikki fór at gerast verri. Eg skuldi ansa mær væl, og ikki hava tungt arbeiði, gjørdi læknin mær greitt. Eg royndi kortini at halda fram í arbeiðinum, tí eg hevði ilt við at góðtaka, at eg var sjúk og at eg ikki kundi arbeiða sum hini, sigur Daysi.

Sjúkan darvaði henni tó so nógv, at hon varð løgd undir eina rættiliga stóra skurðviðgerð. Tað gjørdi, at hon ikki var til arbeiðis í longri tíð, og varð av teirri orsøk uppsøgd. Seinri fekk hon møguleika aftur á sama arbeiðsplássi, og arbeiddi, sum frammanundan, 30 tímar um vikuna. Hetta var kortini ov tungt fyri hana, og fór tí niður í hálva tíð.

## Vart starv

– Leiðarin á dagstovninum greiddi mær frá, at eg hevði ivaleyst møguleika at koma í vart starv. Eg vendi mær síðani til Almannastovuna og greiddi frá mínari støðu. Eftir neyvar læknakanningar kom tilmæli hagani sum segði, at eg skuldi ikki arbeiða meira enn 10 tímar um vikuna. Málsviðgerðin á Almannastovuni royndi fyrst at kanna møguleikarnar fyri endurbúgving áðrenn eg fekk játtað vart starv. Tað tók sína tíð, og eg var ótolin, men umsíðir fekk eg játtað vart starv, soleiðis at eg arbeiði 10 tímar um vikuna, og standi á lønarlistanum fyri 30 tímar. Fyri teir 20 tímarnar rindar Almannastovan arbeiðsplássinum aftur.

## Góðir starvsfelagar

Daysi er sera fegin um at hava fingið vart starv. At hon er í eini serligari skipan, í mun til hini starvsfólkini, merkir hon einki til í gerandisdegnum.

– Øll starvsfólkini kenna mína støðu og hví eg eri í vardum starvi. Tá nýggj starvsfólk koma á stovnin, verða tey eisini kunnað um hetta, so eingin orsøk er hjá mær at endurtaka fyri øllum um mína starvssetan, og tað er sera gott. Starvsfelagar mínir eru sera hjálpsamir, ikki minst tá eg ikki eri so væl fyri, og eg trívist ómetaliga væl í arbeiðinum, sigur Daysi, sum fegnast um at hava fingið møguleika at vera partur av arbeiðslívinum, hóast hon er darvað av sínum likamliga breki.

# ARBEIÐS**EFTIRLITIÐ**



*Maud Wang Hansen*
*forkvinna*

## *Er tað forsvarligt, at Arbeiðseftirlitið verður skert við fleiri ársverkum?*

Arbeiðseftirlitið hevur eftirlit við trygdini á øllum almennum stovnum, harundir á øllum barnagørðum, spæliplássum, sambýlum, verkstøðum og stovnum, har limirnir í Føroya Pedagogfelag arbeiða.

Trygdin er tað týdningarmesta á einum arbeiðsplássi. Trygdarskeið verða gjørd til tess, at leiðslur og trygdarumboð vita, hvat teirra ábyrgd er, tá talan er um trygdarviðurskiftini á arbeiðsplássinum. Eitt er tað fysiska arbeiðsumhvørvið, eitt annað er tað sálarliga arbeiðsumhvørvið. Tað er ábyrgdin hjá trygdarumboðum at virka fyri, at tað er trygt og gott at vera á einum arbeiðsplássi. Fyri at kunna røkja uppgávurnar sum trygdarumboð til fulnar er neyðugt við tøttum samskifti við myndugleikarnar, t.e. Arbeiðseftirlitið.

Sálarliga arbeiðsumhvørvið er avgerandi fyri, hvussu fólk trívast á einum arbeiðsplássi, og tað er ein stór ábyrgd at hava at tryggja, at hesi viðurskifti eru góð. Serliga er tað trupult í løtuni, har nógv starvsfólk eru sett niður í tíð, fólk eru uppsøgd, og eingir pengar eru til avloysarar, tá starvsfólk eru sjúk ella burtur frá arbeiði. Tað merkir, at færri fólk skulu náa tað, sum fleiri áttu at gjørt, og tað sigur seg sjálvt, at hetta gongur út yvir trygdina. Arbeiðstrýstið er stórt og tænastustøðið høgt, og trygdin eigur eisini at fylgja við.

Fatanin av arbeiðsumstøðunum hjá Arbeiðseftirlitinum er, at tey ikki í nóg stóran mun hava orku til at røkja allar uppgávur við núverandi normering. Hetta er ikki ein kritikkur av tí arbeiði, sum verður gjørt, men heldur ein staðfesting av, at hetta er eitt komplekst og umfatandi arbeiðsøki. Alt ov ofta síggja vit fyribilsgóðkenningar, og tað tekur langa tíð at fáa tær endaligu góðkenningarnar upp á pláss. Samstundis er tað er langt ímillum skeiðini. Soppavøkstur hoyra vit ofta um á arbeiðsplássum, og tað er neyðugt, at tílíkar staðfestingar verða tiknar í størsta álvara. Hetta er bæði tíðarkrevjandi og torført at hava við at gera.

Hvussu hevur landsstýrismaðurin hugsað sær, at alt hetta blívur betri við færri starvsfólkum? Hvør tekur nú ábyrgdina av trygdini á okkara arbeiðsplássum? Út frá hesum má spurnartekin setast við avgerðina hjá Føroya Løgtingi og ætlan landsstýrismansins um at niðurraðfesta arbeiðseftirlitið!



# **SYNGJA** SAMA LAG

*Plantur skulu hava vatn og ljós. Men syngur tú fyri teimum, so trívast tær og vísa sín vakurleika. Tær eru sum børnini, sum næla og festa røtur, hóast lívið og vakstrarlendið eru ymisk. Á skuggasíðuni er ikki so gott at vera. Okkum leingist øllum eftir sól og gleði, men skulu kortini látast at vera líkaglað og kul. Børnini ganga í kulum klæðum og hava kulan hjálm. Og tað sama er við filmum, spølum og tónleiki.*




*Steintór Rasmussen*
*lærari, tóna- og rímsmiður*

At vera kul er nú á døgum vorðin ein livihháttur og hugsananháttur hjá børnum. Men í barnaverðini ber alt til, og í flest øllum gentum og dreingjum býr framvegis ein spennandi og ríkur hugaheimur.

Í sangi er lív, rørslur og nærvera. Og í míni verð er ein góð barnafløga eitt spennandi tyssi av litríkum sangum, sum við fangandi orðum og løgum lýsa dagin og spegla lívið hjá børnum. Eg haldi, at tað er umráðandi, at børnini kenna seg aftur í sangunum. At sangurin røkkur inn í hjartað ella nemur við smílibandið.

Børn eru kensluborin, erlig, forvitin og livandi. Oftani eru tey betri publikum enn vaksin fólk, ið hava gloymt sín egna móttakara og at gæva gætur. Men hvat er á okkara døgum ein góður sangur?

Sjálvur dámar mær væl, at tað er ein góður moralur ella boðskapur at finna í sangunum. Tað er sjálvandi munur á at skriva søgur og rím til børn í skúlaaldri og til smærri børn. Men sum heild eru børn rættvísir dómarar, sum brúka tey vaksnu sum hjásitarar. Ein góð barnafløga skalt helst vera heilstoypt við frískum, góðum og originalum innihaldi.

Og so mugu vit ikki gloyma, at børn eru ymisk, eins og vaksin. Summi børn elska at syngja, tey raka tónan, minnast orðini, hava íbornin evni og sýna frá fyrsta degi áhuga. Onnur børn hava ikki fingið somu vøggugávu og láta ikki sum sangfuglar flest. Tí er avbjóðingin meira, hvussu fáa vit sangløtuna at gerast ein góð uppliving fyri allan flokkin.

Vit kenna tað ivaleyst frá okkara yrki sum pedagogar og lærarar...Summi hava tað meira í sær enn onnur. Men hvør er gulllykilin inn í barnahjartað?

Í míni verð er tað púra greitt, at skalt tú hugtaka og menna eitt barn, so mást tú vera til staðar. Tað er gott at vera fyrireikaður og hava eina ætlan, men sjálv løtan og tað spontana eigur altíð at koma framum. Tú skalt alla tíðina avlesa støðuna. Um sangurin byrjar at gerast keðiligur? Nær verður tað ov nógv? Liva børnini við í sanginum? Hvussu nógv tíma og orka tey?

Sjálvur havi eg góðar royndir av at fóðra børnini við sangbløðum, oftani við tekningum á, soleiðis at tað aloftast er okkurt nýtt á skránni. Og eg hevði ikki dugað at verið sanglærari, uttan at eg fortaldi søgur, fann uppá ymiskt spøl og kappingar, at vit klappaðu taktir, dansaðu og rørdu okkum eitt sindur. Av tí at sangur er so stórur partur av føroysku mentanini, so eigur løtan at vera so góð og rúmlig, at sjálvt tøgnin skal vera meira enn vælkomin!

Tað eru nógvir góðir føroyskir sangir, bæði teir, sum hava sín uppruna her á landi, men eisini nógvir sangir, sum eru umsettir úr donskum og øðrum máli. Og við einum løttum lagi og góðum boðskapi kanst tú uppala og fáa børnini at eta sunt, busta tenn, drekka trý gløs av mjólk um dagin, at ansa eftir sær í ferðsluni, og vera góð og virða hvønnannan, skila ymiskleikar og ganga trygt ígjøgnum dagin. Men vit mugu ikki gloyma ta ábyrgd, vit hava sum vaksin í okkara yrki á barnagørðum, stovnum og skúlin. Tí mugu vit eisini ansa eftir, at vit við okkara svarum upp á lívsins stóru spurningar ikki ávirka børnini meira, enn rætt er.

Hóast lívið kann verða tungt og trupult, so dámar mær best at skriva jaligar sangir til børn. Tað er ikki avgerðandi, um sangurin er spyrjandi, sigandi, stuttligur ella sentimentalur. Tað, sum hevur týdning, er at sjálv rótin er natúrlig, og at sangurin kveikir og letur upp barnasinnið.

Sjálvur haldi eg, at Kular Røtur royna at taka børnini í álvara. Og at hetta verður gjørt á erligan og góðsligan hátt. Tað eru lívsjáttandi at syngja saman við sínum egnu børnum, men tað er ikki minni vakurt at uppliva at sangirnar fara á flog.... Úr tíni egnu stovu, út í dagstovnar og skúlar og kring landið. So tey smáu nevini, kórið, sum heldur lív í sangunum, gerst fríari og vakrari.

FØROYA PEDAGOG FELAG

# AÐALFUNDUR 2011

verður á Hotel Føroyum
leygardagin 19. mars kl. 10.00

*Innskriving fer fram frá kl. 9.00*

**Tilmeldingin** til aðalfundin skal vera persónlig. Hetta gera tit við at tilmelda tykkum til aðalfundin yvir heimasíðu felagsins á
*www. pedagogfelag. fo*

Fráboðast skal um tit ynskja at verða við til náttturðan.

Tilmeldingin skal vera felagnum í hendi í seinasta lagi
***mánadagin 14. mars***

## Gisting

Felagið hevur gjørt avtalu við Hotel Føroyar um at limir kunnu gista á hotellinum fyri
Kr. 600 *fyri einkult rúm v/morgunmati*
Kr. 800 fyri dupultrúm
( 2 pers. ) *v/morgunmati*

## Náttturði

Felagið bjóðar náttturða aftaná aðalfundin.

## Atkvøðuseðil

verður útflýggjaður á aðalfundinum.

## Gestarøðarir verða:



*Hildur Patursson, Master of Education*
Evni: Rættur barnsins til ein góðan barnagarð



*Rógvi Thomsen, cand. ped., námsfrøðiligur ráðgevi, NSR tænastan*

Evni: Fólk, ið bera brek. – Mannarættindi eru galdandi fyri øll.
Ein etisk moralsk lýsing av ítøkiligu fatanini av ST sáttmálum í Føroyum, serstakliga í mun til tey, ið bera brek.

## Fundarskrá:

A. Val av fundarstjóra og skrivara
B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar
D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar
E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar
F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins
G. Val av formanni annað hvørt ár
H. Val av nevnd
I. Val av eykalimum
J. Val av grannskoðarum
K. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi
L. Ymiskt

Vælkomin á aðalfund.
n. v.
Maud Wang Hansen,
forkvinna

FØROYA PEDAGOG FELAG

# AÐALFUNDARSKRÁIN

## H. Val av nevnd

Veljast skulu 3 nevndarlimir – 2 nevndarlimir fyri eitt 2 ára skeið og 1 nevndarlimur fyri eitt 1 ára-skeið.

Fyri vali standa:

- Jógvan Philbrow, pedagogur
- – tekur við afturvalið
- Sigga Óladóttir Joensen, pedagogur
- – tekur ikki við afturvalið
- Jan Mølvad Laursen, pedagogur
- – tekur ikki við afturvalið

viðmerkjast skal, at Jan Mølvad Laursen, ið varð valdur á aðalfundinum í 2010, segði seg úr nevndini í jan. 2011, og hevur Elin N. W. Tausen, fyrstvaldi eykalimur, havt sæti í nevndini fyri hann hetta fram til aðalfundin. – Tað merkir, at ein av nevndarlimunum tí bert skal veljast fyri eitt 1 ár.

**Valevnini eru:**
Elin N. W. Tausen, pedagogur
Guðrun Eysturlíð, pedagogur
Jannie S. Jacobsen, hjálparfólk
Jógvan Philbrow, pedagogur

## I. Val av eykalimum

Veljast skulu tríggir eykalimir.

Í ásetingunum í lógunum § 11, stk. 4 er ásett, at av eykalimunum skal minst ein vera hjálparfólk og minst ein pedagogur.

Eykalimir verða valdir hvørt ár og valskeiðið er tí eitt ár.

## J. Val av grannskoðarum.

Smb. ásetingum í lógunum § 13,stk. 2 stendur at tveir internir grannskoðarir skulu veljast hvørt ár.

**Internu grannskoðarir nú eru:**
Majbritt Simonsen, pedagogur
Vera Bjørgvin, pedagogur

## K. Viðgerð av innkomnum uppskotum

## 1. Uppskot til lógarbroytingar frá nevndini

### Atkvøðugreiðsla 1

Uppskot til broytta orðing (broytingarnar eru skrivaðar við reyðum):

§ 6 Brot á limaskyldur

1. stk. Nevndin kann fyri styttri ella longri tíðarskeið koyra úr felagnum limir, ið bróta avtalur ella sáttmála, ið felagið hevur gjørt ella á einhvønn annan hátt mótarbeiða áhugamálum felagsins. Er talan um álvarsom brot, kann nevndin avgera, at limur verður koyrdur úr felagnum. Eisini kann nevndin taka avgerð um at áleggja slíkum limum sekt, sum í mesta lagi svarar til 1 mánaðarløn sambært byrjunarlønini fyri pedagogar í galdandi pedagogsáttmála.

2. stk. Limur hevur rætt til skrivliga ella munnliga, at føra fram síni sjónarmið fyri nevndini, áðrenn avgerð verður tikin.

3. stk. Limurin, sum fyri styttri ella longri tíð ella endaliga verður koyrdur úr felagnum, kann krevja, at spurningurin verður lagdur fyri fyrstkomandi aðalfund til endaliga avgerðar.

4. stk. Til ~~avgerðir í nevndini samb. 1. stk. og á aðalfundinum samb. 3. stk. at~~ samtykkja at koyra lim úr felagnum samb. 1. stk. og á aðalfundinum samb. 3. stk. krevst, at í minsta lagi 2/3 av teimum, sum eru á fundi, atkvøða fyri.

5. stk. ~~Limir, ið eru í eftirstøðu í meira enn 3 mánaðir verða eftir eina ávaring koyrdir úr felagnum.~~ Nevndin kann, eftir skrivliga ávaring koyra lim, ið eru í eftirstøðu í meira enn 3 mánaðir, úr felagnum.

6. stk. Ein limur, sum er koyrdur úr felagnum, kann eftir umsókn gerast limur aftur, tá nevndin heldur hetta, móti gjaldi, sum nevndin ásetur. Gjaldið kann í mesta lagi svara til 1 mánaðarløn sambært byrjunarlønini fyri pedagogar í galdandi pedagogsáttmála. Noktar nevndin at geva viðkomandi limaskap aftur, kann viðkomandi krevja, at spurningurin verður lagdur fyri fyrstkomandi aðalfund til viðgerðar.

### Atkvøðugreiðsla 2

(broytingarnar eru skrivaðar við reyðum):

## § 8. Aðalfundur

1. stk. Aðalfundurin hevur hægsta vald í felagnum.

Aðalfundurin ásetir høvuðsstevnumið felagsins, og tekur avgerð í teimum spurningum, sum nevndir eru í § 8, stk. 5

2. stk. Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið hann er lógliga fráboðaður.

Bert uppskot, ið eru á fundarskránni kunnu verða viðgjørd á aðalfundinum.

3. stk. Allir limir felagsins hava atgongd til aðalfundin.

Óvirknir limir eru ikki valbærir og hava ikki atkvøðurætt. Sama er galdandi fyri limir, ið eru í eftirstøðu í meira enn 3 mánaðar roknað fram til 1. februar.

4. stk. Ársaðalfundurin verður hildin á hvørjum ári ~~í mars mánaði~~ áðrenn 15. apríl.

Nevndin skal lýsa aðalfundin í føroysku bløðunum í seinasta lagi 15. januar.

Ynskir limur uppskot viðgjørt á aðalfundinum, skal uppskotið latast nevndini við skrivligari váttan frá viðkomandi uppskotsstillara, og vera nevndini í hendi ~~í seinasta lagi~~ áðrenn 1. februar.

Sama er galdandi fyri uppskot um ásetan av limagjaldi.

Fundarskrá fyri aðalfundin skal verða send út til limirnar í seinasta lagið 7 dagar áðrenn aðalfundin.

5. stk. Ársaðalfundurin hevur hesa fundarskrá:

A. Val av fundarstjóra og skrivara
B. Ásetan av fundarskipan fyri aðalfundin
C. Frágreiðing frá nevndini til góðkenningar
D. Framløga av grannskoðaðum roknskapi og fíggjarstøðu til góðkenningar

E. Framløga av felagsins fíggjarætlan til kunningar
F. Viðgerð av ætlaða virksemi felagsins
G. Val av formanni annað hvørt ár
H. Val av nevndl. G. Val av eykalimum
H. Val av grannskoðarum
I. Viðgerð av innkomnum uppskotum og ásetan av limagjaldi
J. Ymiskt

7. Tá nevndarval og formansval skal fara fram eru hesar reglur galdandi:

Nevndarval og formansval fara fram við brævatkvøðugreiðslu eftir hesum reglum:

1. Skrivlig atkvøðugreiðsla.

2. Teir limir felagsins, sum ynskja tað, kunnu í seinasta lagi vikudagin undan aðalfundinum greiða brævatkvøðu, við í seinasta lagi hendan dag, at lata nevnd felagsins brævatkvøðuseðil sín.

Nevnd felagsins skipar fyri hesari brævatkvøðugreiðsluni, soleiðis at brævbjálvarnir við brævatkvøðunum ikki verða latnir upp, fyrr enn í sambandi við uppteljingina á aðalfundinum.

Nevndarlimur, sum stendur fyri vali, skal tó ikki skipa fyri brævatkvøðugreiðsluni.

3. Bert fullgildugir limir felagsins kunnu stilla lim upp sum valevni.

4. Tann sum verður stillaður upp skal skrivliga váttað, at vilja taka við valinum.

5. Uppskot til valevni, saman við váttan frá tí uppstillaða, skulu vera felagnum í hendi í seinasta lagi 1. febr.

Nevndin kann útseta freistina til 5. febr.

6. Brævatkvøðuseðil verður latin teimum limum felagsins, sum ynskja at greiða brævatkvøðu.

7. Teir limir, sum innan freistina í pkt. 2 hava greitt brævatkvøðu, kunnu ikki greiða atkvøðu á aðalfundinumí sambandi við tey val, har viðkomandi hevur latið nevndini brævatkvøðuseðil sín.

8. Limur, sum greiðir atkvøðu, kann í mesta lagi greiða atkvøðu fyri so nógvum av teimum uppstillaðu valevnunum, sum talið av teimum sum standa fyri vali.

9. Tey valevni, sum fáa flestar atkvøður eru vald, tó skulu ásetingarnar í § 11,stk. 2 verða uppfyltar.

10. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, so verður lutakast millum tey valevni, sum fáa líka nógvar atkvøður.

a. Uppskot til formansvalevni, saman við váttan frá tí uppstillaða, skulu vera felagnum í hendi áðrenn 1. f ebruar. Nevndin kann útseta freistina til 5. febr.

Somuleiðis skulu uppskot til valevni til nevndina, saman við váttan frá tí uppstillaða, vera felagnum í hendi áðrenn 15. februar. Formansvalevnini og nevndarvalevnin skulu lýsast á heimasíðu felagsins so skjótt freistin at stilla upp er farin.

b. Brævatkvøðuseðil verður sendur øllum limum felagsins við atkvøðurætti í prentaðum og frankeraðum brævbjálva í so góðari tíð, at limir úr øllum landinum náa at greiða atkvøðu.

c. Limir felagsins, kunnu í seinasta lagi vikudagin undan aðalfundinum greiða brævatkvøðu, við í seinasta lagi hendan dag, at lata grannskoðara felagsins brævatkvøðuseðil sín.

Grannskoðari felagsins skipar fyri hesari brævatkvøðugreiðsluni, soleiðis at valúrslitið verður kunngjørt á aðalfundinum.

d. Bert fullgildugir limir felagsins kunnu stilla lim upp sum valevni.

e. Tann sum verður stillaður upp skal skrivliga vátta, at vilja taka við valinum.

f. Limur, sum greiðir atkvøðu, kann í mesta lagi greiða atkvøðu fyri so nógvum av teimum uppstillaðu valevnunum, sum talið av teimum sum standa fyri vali.

g. Tey valevni, sum fáa flestar atkvøður eru vald, tó skulu ásetingarnar í § 11,stk. 2 verða uppfyltar.

h. Tá val av eykalimum fer fram eru ásetingarnar í § 11, stk. 4 galdandi.

## Atkvøðugreiðsla 3:

Formaður og nevndarlimir verða valdir fyri 3 ár í senn

Broytingarnar eru skrivaðar við reyðum

### a) § 10 Formaður

1. stk. Formaður felagsins verður valdur á ársaðalfundinum, við brævatkvøðugreiðslu sambært § 8, stk. 7 og situr hann eitt 3 ára skeið.

Afturval kann fara fram. Uppskot til formansevni verður latið inn sambært ásetingunum í § 8, stk. 7.

Valdur formaður bindir seg til at taka við fulltíðarstarvi í felagnum.

2. stk. Tann, ið fær flestar atkvøður er valdur formaður fyri eitt tvey trý ára skeið

### b) § 11 Nevnd

2. stk. Í nevndini sita 4 nevndarlimir og formaðurin. Nevndarlimir verða valdir fyri tvey trý ár, soleiðis at nýval verður av tveimum nevndarlimum og formanni líka ár og tveimum nevndarlimum ólíka ár. soleiðis at:

- 1. árið standa formaðurin og 2 nevdarlimir fyri vali
- 2. árið standa 2 nevndarlimir fyri vali
- 3. árið er einki formans- ella nevndarval.

## Atkvøðugreiðsla 4

Talan er um uppskot til ískoyti/broyting til grein 10, stk. 2. Ískoytið/broytingin er skrivað við reyðum

### § 10 Formaður

2. stk. Tann, ið fær flestar atkvøður er valdur formaður fyri eitt ----- ára skeið.

Er bert eitt valevni til fastan formann, so er hesin valdur uttan atkvøðugreiðslu. um viðkomandi fær ein meiriluta av greiddum atkvøðum. Fær formansvalevni ikki meirilutan av greiddum atkvøðum, skipar nevndin seg við formanni og skipar í seinasta lagi 6 vikur aftaná árliga aðalfundin fyri nýggjum formansvali sambært reglunum í grein 8, stk. 7. Nevndin ásetur freistina fyri nær brævatkvøðuseðlarnir skulu latast grannskoðara felagsins. Uppstillingarfreistin er í tílíkum førum 3 vikur undan at brævatkvøðuseðlarnir skulu verða latnar grannskoðara felagsins.

## Atkvøðugreiðsla 5

Talan er um broyting av grein 8, stk. 6 og

grein 9, stk. 1. Broytingarnar eru skrivaðar við reyðum

a) Grein 8 stk. 6. Avgerðir á aðalfundinum verða samtyktar við vanligum meiriluta.

Til lógarbroytingar krevst tó, at ~~15%~~ 10% av limunum eru møttir á aðalfundi, og at viðtøkan verður samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum. Til at taka felagið av krevst, at 2/3 av limum felagsins eru møttir á aðalfundi, og at viðtøkan verður samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum. Um ikki meirilutin, sum er nevndur í teimum báðum fyrru stykkjunum, eru møttir á aðalfundi, men viðtøkan tó er samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum, verður eykaaðalfundur innkallaður, samsvarandi ásetingunum í hesum lógum, og kann lógarbroytingin/avtøkan av felagnum tá verða samtykt við 2/3 av greiddum atkvøðum ~~uttan mun til hvussu nógvir limir eru møttir á fundi.~~, í sambandi við lógarbroyting, uttan mun til hvussu nógvir limir eru møttir á fundi og í sambandi við avtøku av felagnum, um í minsta lagi 25 % av limum felagsins eru møttir á fundi.

b) **§ 9 Eykaaðalfundur**
1. stk. Eykaaðalfundur verður lýstur, um nevndin ynskir tað, ella um minst ~~25 limir~~ 10 % av limunum krevja hetta, og teir samstundis skrivliga senda inn fráboðan um tað mál, teir ynskja viðgjørd á eykaðalfundinum.

## Atkvøðugreiðsla 6

Broytingarnar eru skrivaðar við reyðum

a) § 3 Limaskapur

1. stk. Rætt til vanligan limaskap hava tey, sum hava námsfrøðiútbúgving el. líkn., hjálparfólk, eisini tey hjálparfólk, sum lesa á netinum og eru í farloyvi í sambandi við ólønta starvsvenjing og verkstaðsassistentar, sum starvast á pedagogiskum arbeiðsplássum. Limir, sum eru í barsilsfarloyvi eru at meta sum vanligir limir.

b) § 4 Óvirknir limir
1. stk. Vanligir limir, sum í styttri ella longri tíð ikki hava starv, herundir limir, sum eru í farloyvi uttan løn ella sum søkja starv, kunna gerast óvirknir limir. Sama kunnu limir, sum eru farnir yvir í annað starvsøki, og limir sum eru fluttir úr Føroyum. Persónar, sum eru eftirløntir frá størvum, og sum vóru vanligir limir, tá ið teir fóru frá, kunnu eisini gerast óvirknir limir, um teir hava verið virknir ella óvirknir limir í felagnum í 5 ár.

c) § 5 Limaskyldur
1. stk. Limirnir hava skyldu at halda lógir felagsins og virða tær av felagnum gjørdu avtalur og sáttmálar og tær avgerðir, sum felagið hevur tikið í m. ø. fakligum spurningum.

d) § 5, stk. 5 ~~5. stk. Limirnir skulu virka fyri, at størv av áhuga verða lýst leys bæði í fakbløðunum og í teimum føroysku bløðunum.~~

e) § 7 Limagjald
1. stk. Aðalfundurin ásetir limagjaldið. Nevndin kann gera sertreytir ella sleppa einum limi undan limagjaldi.

f) § 8 stk. 4. Ársaðalfundurin verður hildin á hvørjum ári ~~í mars mánaði~~ áðrenn 15. apríl.

g) § 11, stk. 2, 3. petti. Nevndin skipar seg við næstformanni og skrivara ~~og kassameistara.~~

Nevndin skipar sjálv fyri arbeiðsgongdini í serligari starvsskipan.

Avgerðir í nevndini verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Um atkvøðurnar standa á jøvnum, fellur málið.

3. stk. Nevndin hevur fund eina ferð um mánaðin, ella tá ið formaðurin ella helvtin av nevndarlimunum ynskir tað, og skal gerðabók felagsins undirskrivast av formanni og nevndarlimum felagsins. Í gerðabókina skulu skrivast samtyktir og stutt frágreiðing um viðgerðina av tí einstaka málinum. Nevndarlimur kann krevja møguliga serstøðu sína skrivaða í gerðabókina.

Fundarevni til vanligar nevndarfundir skulu sendast út minst 4 dagar áðrenn fundin.

Mál, ið limir felagsins ynskja viðgjørd, skulu vera nevndini skrivliga í hendi í seinasta lagi 4 dagar áðrenn nevndarfund. Í undantaksføri kann víkjast frá frammanfyri nevndu freistum.

4. stk. Eykalimir. Valdir verða 3 eykalimir. Av hesum eykalimum skal minst ein vera hjálparfólk og minst ein pedagogur. Eykalimir verða valdir á ársaðalfundinum hvørt ár og valskeiðið er tí eitt ár.

Reglurnar í § 8, stk.7, pkt. d og f ~~1,3,8,9 og 10~~ eru eisini galdandi fyri val av eykalimum. Fyrstvaldi eykalimurin tekur við, tá ein av verandi nevndarlimum ferfrá ella ikki kann møta í longri tíð. Eykalimurin situr fyri viðkomandi nevndarlim, so leingi hesin er burturstaddur,tó ikki longur enn til komandi ársaðalfund, tá valskeiðið hjá eykaliminum gongur út. Talið av atkvøðum, sum hvørt valevni fær, er avgerandi fyri, hvør er fyrst- næst- og trivaldur. ~~Um bert 3 valevni eru til eykalimir, so eru teir valdir, og lutakast verður um hvør er fyrst- næst- og trivaldur.~~

i) § 13. stk 3. Felagið verður bundið við tveimum undirskriftum, har onnur skal vera frá formanninum ella ~~kassameistara~~ næstformanni felagsins. Nevndin kann geva nevndarlimi ella starvsfólki fulltrú at binda felagið innan nærri ásettar karmar.

§ 15 Avtøka av felaganum
1. stk. Felagið kann bert avtakast ella samskipast við annað felag, um aðalfundurin góðkennir tað. Tá skal farast fram eftir § 8, stk. 6. í ~~nevndu reglugerð~~ hesum lógum felagsins.

## 2. Uppskot frá limi til umrøðu á aðalfundinum:

Um at fáa sett inn í sáttmálan, at tað er grundlógartryggjaður rættur at starvsfólk eru í fakfelag

## 3. Uppskot frá limi til umrøðu á aðalfundinum:

Um tørvin á, at vanligir pedagogar eisini verða umboðaðir í nevnd felagsins

## L. Ymiskt

*Nevndin*

# FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI



*Maud Wang Hansen*
*forkvinna*

## Nýggj nevnd

Nú eitt ár er runnið síðan seinasta aðalfund – og eg taki ikki munnin ov fullan, um eg sigi, at nógv hevur verið at taka hond um. Nevndin í Føroya Pedagogfelag fekk ein nýggjan nevndarlim og nýggja forkvinnu á seinasta aðalfundi. Síðani hevur ein nevndarlimur tikið seg úr nevndini, soleiðis at ein tiltakslimur hevur sitið í nevndini síðani oktobur 2010. Sum nýggj forkvinna var tað ein avbjóðing at koma til arbeiðis – hóast nógvar royndir í nevndararbeiðinum. At vera forkvinna og at vera nevndarlimur er hvør sítt, og tað eigur tað eisini at verða. Samstarvið og stevið í nevndini er gott, og nógv arbeiði er gjørt.

## Sáttmálasamráðingar og Fakfelagssamstarvið

Tað fyrsta, sum var á skránni, vóru sáttmálasamráðingarnar. Longu 2. apríl var fyrsti regluligi formansfundur; hjá nýggju forkvinnuni í Fakfelagssamstarvinum. Tað var hugaligt at hitta hinar formenninar/forkvinnurnar, sum høvdu tikið stig til hetta formella samstarvið millum 5 tey størstu fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum. Beinanvegin varð farið undir at fyrireika komandi samráðingar, og galdandi sáttmálar vórðu sagdir upp. Í juni mánaði handaði Fakfelagssamstarvið felagskrøv og fekk samstundis handað mótkrøv frá arbeiðsgevarunum. Tað vóru ikki hissini mótkrøv, vit fingu handað. Ovast á breddanum stóð, at øll skuldu 3% niður í løn. Harumframt lá uppskotið um eftirlønarreformin, sum skuldi hann koma í gildi 1.1.2011, á borðinum. Um eftirlønarreformurin kom í gildi tá, vildi tað merkt enn ein lønarniðurskurður fyri teir limir, sum ikki hava vunnið sær í minsta lagi 15% í eftirløn. Onnur mótkrøv bendu beinleiðis á, at ætlanin er at trekkja tenninar úr fakfeløgunum og at skerja tey vunnu rættindini, sum staðfest eru í teimum ymisku sáttmálunum. Tað var lítið hugaligt at sita yvir av fíggjarmálaráðharranum, sum longu fyrsta dagin hevði tikið støðu til ikki at luttaka í samráðingunum, men sum við opnum andliti blástemplaði ætlanina um at seta 7000 alment lønt starvsfólk niður í løn, umframt at skerja teirra vunnu sáttmálarættindi.

Formansskifti varð tvær ferðir í Føroya Lærarafelag, meðan samráðingar gingu, og hóast tað, so var eingin ivi um, at Fakfelagssamstarvið hevði staðfest sín rætt og vísti sína styrki í samstarvinum og gjøgnum samráðingarnar. Tað var drúgt at koma nakran veg við samráðingunum, og eina løtu tyktist tað, sum var eitt stórt verkfall einasta loysnin. Eingin ivi var um, at tað ynskti okkara mótpartur. Tá samráðingarnar slitnaðu, valdi Fakfelagssamstarvið at fara samlað til seming. Tann 30. nov. skrivaðu feløgini undir eina semju, sum gav limum okkara 1% upp á lønina við einum eitt ára sáttmála. Umframt hetta eisini eina betri verju av álitisfólkunum, sum nú hava 3 mánaða longri uppsagnarfreist. Tað var við ringum tannabiti, at Føroya Pedagogfelag, eins og hini feløgini, mátti ásanna, at vit høvdu mist møguleikan fyri at samráðast um okkara serkrøv. Hóast úrslitið ikki er nakað at rópa hurrá fyri, so er tað hóast alt betri, enn vit at enda høvdu væntað, og betri enn úrslitið av einum møguliga drúgvum verkfalli. Í hvussu er funnu feløgini styrkina í samstarvinum, og tað kemur okkum vónandi til góðar í komandi samráðingum.

## Arbeiðsbólkar undir samráðingunum

Fleiri bólkar vóru skipaðir, meðan samráðingarnar fóru fram. Ein lýsingarbólkur stóð fyri einum lýsingarátaki, sum skuldi varpa ljós á alment sett starvsfólk og beina burtur fatanina av, at talan bert er um serliga vællønt starvsfólk í almennu fyrisitingini. Lýsingarbólkurin skipaði eisini fyri at senda postkort runt landið og bjóðaði fólki ókeypis lutaseðlar við einum hópi av góðum vinningum á. Lýsingarátakið vann stóran frama millum vanligar borgarar.

Ein greinabólkur varpaði við fleiri áhugaverdum greinum í bløðunum ljós á fíggjarligu viðurskiftini í samfelagnum og tengdi hesar greinar at fíggjarlógaruppskotinum. Hermann Oskarsson helt ein fyrilestur og skrivaði eisini onkra góða og viðkomandi grein.

Ein verkfalsbólkur var skipaður til tess at leggja til rættis eitt møguligt verkfall. Hesin bólkur arbeiddi miðvíst fyri at skipa øll viðurskfti, sum neyðugt var at taka støðu til, um verkfall varð lýst.

## Fasti gerðarrætturin

Føroya Pedagogfelag hevði eitt mál fyri í fasta gerðarrættinum um eina tulkingarósemju í sambandi við nýggju stigatalsskipanina. Felagið tapti hetta mál, og vit mugu í løtuni liva við, at limir okkara ikki eru løntir á sama hátt, hóast teir hava sama starvsaldur. Nevndin tók hetta upp til sersamráðingarnar fyri at fáa rætta upp á skeivleikarnar, men var tað púra greitt, at kommunali arbeiðsgevarin ikki er sinnaður í at fáa hetta í rættlag.

Forkvinnan hevur saman við umboðum úr øðrum fakfeløgum luttikið í einum arbeiði við at endurskoða fasta gerðarrættin. Ætlanin við hesum arbeiði er, at fasti gerðarrætturin í framtíðini skal virka betur, og at tað skal loysa seg at leggja mál fyri fasta gerðarrættin.

## Norðurlendskt samstarv

Føroya Pedagogfelag luttekur í norðurlendskum samstarvi bæði á barnagarðs- og forskúlaøkinum NLS og á sosialpedagogiska økinum NFFS. Umfamt regluligar fundir luttók samlaða nevndin á einum summarskeiði hjá NLS í Finnlandi. Hetta var saman við umboðum frá Føroya Lærarafelag. Evnini á summarskeiðinum vóru um skúlabørn og trivnaðin hjá teimum, sæð úr ymiskum sjónarhornum. Tað var heilt greitt, at framtíðin kemur at vísa ein øktan tørv á samstarvi millum lærarar og pedagogar. Summarskeiðið var eitt gott høvi hjá nevndini at finna tað góða arbeiðslagið, sum eisini hevur eyðkent nevndina hetta árið.

Tað er eingin ivi um, at tað norðurlendska samstarvið er við til at styrkja fatan-

ina av okkara fakliga arbeiði, bæði á starvsøkinum og innan fakfelagsarbeiði. Í NFFS er ein arbeiðsbólkur settur, at gera eitt upprit um ST-barnarættindasáttmálan og hvussu børn á stovni og í forsturfamiljum eru tryggjað hesi rættindi, við pedagogum sum teirra talsfólk.

## Skeið

fyri serligum skeiðum fyri álitisfólkum. Ria Tórgarð skipaði fyri tveimum "Tori-skeiðum." Jóhanna Andreassen og Bergtóra H. Joensen skipaðu fyri tveimum skeiðum um "Torføru samrøðuna". Ein uppfylging verður seinni av hesum skeiðum.

Ein røð av skeiðum um sáttmálar og arbeiðsmarknaðarlógir hava verið fyri álitisfólkum og leiðarum. Uml. 90 fólk hava luttikið á hesum skeiðum, ið, Katrin Hammershaimb Thomsen og Jarvin F. Hansen hava skipað fyri.

Eisini verða í mars mánaða tvey skeið fyri álititsfólkum og leiðarum í Fyristingarlógini, ið sakførari felagsins, Páll Nielsen skipar fyri vegna felagið.

Øll hesi skeið hava verið væl umtókt, hóast tað hjá summum stovnum vísir seg at vera torført at fáa fígging til skeiðini. Tað er tíðarkrevjandi at skipa fyri skeiðum og merkir tað arbeiði í felagnum meðan skeiðini verða hildin. Felagið er tó av teirri áskoðan, at tað er ein styrki fyri limirnar, at kunna luttaka á skeiðum, sum beinleiðs vísa til teirra arbeiði og tær støður ein kemur í í sínum arbeiði.

Í samband við sáttmálasamráðingarnar hevur nevndin luttikið á tveimum skeiðum. Eisini hevur Fyrisitingin luttikið av onkrum av skeiðunum.

## Fyrisitingin

Arbeiðið í fyrisitingini er merkt av nógvum limamálum. Tíverri eru ábendingar um, at fíggjarstøðan á ymisku arbeiðsplássunum rakar limirnar meint. Fleiri fólk eru søgd úr starvi vegna sparingar, og onnur eru sett niður í tíð. Tað er ein ring støða at koma í, tá ein missur arbeiðið ella verður skorin í tímum. Tað, sum fyllir nógv í fyrisitingarliga arbeiðinum er, at mannagongdir og ásetingar í sáttmálunum og álitisfólkaavtaluni ikki verða fylgdar. Tað tykist, sum arbeiðsgevarin av sínum eintingum er farin at tulka sáttmálarnar og at skerja tey vunnu rættindini hjá limunum. Hetta eigur ikki at vera so, og felagið brúkar nógva orku upp á at rætta tílíkar skeivleikar. Málsviðgerðin í hvørjum einstøkum máli tekur ómetaliga langa tíð, og tað tykist, sum um myndugleikarnir taka fleiri atlit til rættindi hjá myndugleikunum heldur enn til rættindini hjá limunum. Hetta er beinleiðis slítandi fyri limirnar í Føroya Pedagogfelag. Dømi eru um mál, sum taka fleiri ár at avgreiða, og tað sigur seg sjálvt, at tað krevur nakað heilt serligt av einum starvsfólki, sum fyrst er fyri órøttum, og síðani skal brúka so langa tíð upp á at vinna síni rættindi. Tað virkar, sum arbeiðsgevarin roynir at møða fólk og vónar, at málini verða slept. Fyrisitingin leggur stóran dent á at hjálpa limunum við at loysa tílík mál og gevst ikki, fyrr enn komið er á mál. Felagið tekur í størsta álvara, at limir ikki vera væl viðfarnir, og vil áhaldandi gera sítt til, at slík mál verða handfarin væl.

Sum áður nevnt, so verður tíð brúkt upp á at skipa fyri og luttaka á ymiskum skeiðvirksemi, bæði fyri limir, nevnd og fyrisiting. Fyrisitingin hevur lagt nakrar av telduskipanunum um. M.a. er í umbúna at leggja nýggja bókhaldsskipan inn, umframt at leggja um til talgilda journalskipan. Hetta fer at bøta munandi um arbeiðsgongdina í felagnum, og til alt er komið upp á pláss, vóna vit, at limir halda okkum til góðar.

## Álitisfólkafundir og limafundir

Regluligu álitisfólkafundirnir hava verið 4 í tali. M.a. hava sáttmálasamráðingarnar verið umrøddar; og eisini varð trivnaðarkanningin, sum Granskingardepilin gjørdi á dagstovnaøkinum løgd fram. Ynski er um at fáa gjørt eina líknandi kanning á serstovnaøkinum. Álitisfólkamappan er í gerð, og tað verður spennandi at síggja endaliga úrslitið av hesum arbeiði. Arbeiðið í álitisfólkabólkunum gongur væl, og hetta er við til at styrkja álitisfólkini á einstøku arbeiðsplássunum.

Nevndin skipaði í juni fyri limafundum fyri leiðarar og nýggjar pedagogar. Ein limafundur hevur verið, har Trivnaðarkanningin bleiv løgd fram. Tað verða fleiri av hesum fundum seinni í ár, men tíverri hevur granskarin sjálvur ikki haft stundir at luttaka á fleiri fundum enn. Stig var tikið til at skipa fyri einum eykaaðalfundi til tess at fremja lógarbroytingarnar, sum arbeiðsbólkurin, ið hevur endurskoðað lógir felagsins, hevði arbeitt við. Undirtøkan fyri hesum fundi var ikki nóg stór, og ætlaði fundurin bleiv tí avlýstur. Nevndin vónar, at hesar lógarbroytingar verða framdar á komandi aðalfundi.

Nevndin hevur saman við Heina Lützen frá LÍV skipað fyri limafundum kring landið, har samlagstryggingin og komandi sáttmálasamráðingar hava verið umrødd.

## Leiðararáðið

Leiðararáðið skipaði tann 18. november fyri felags Landsleiðaradegi. Fyri fyrstu ferð luttóku leiðarar frá øllum sáttmálaøkinum. Leiðaradagurin var væl fyriskipaður, og fleiri sera áhugaverdir fyrilestrar vórðu hildnir. Leiðararáðið sigur, at fleiri limir brúka møguleikan at seta seg í samband við leiðararáðið, og tað er at fegnast um. Nevndin og leiðararáðið skipa fyri felagsfundum, har arbeiðið hjá leiðararáðnum og viðurskifti hjá leiðarum verða umrødd. Í heyst luttóku limirnir í Leiðararáðnum á einari ráðstevnu í Danmark um pedagogiska leiðslu. Leiðarafundur verður hildin í apríl/mai, har val er til leiðararáðið.

## Pedagogblaðið

Blaðið er aftur komið út fýra ferðir. Tað verður løgd nógv orka í at fáa blaðið gjørt so viðkomandi og gott sum gjørligt fyri allar limir. Blaðið verður borið øllum tingfólkum, umframt at tað verður lagt út á Pedagogskúlan. Tað er ein stór avbjóðing at fáa eitt breitt fakligt innihald í blaðið, og tað kann altíð gerast betri við limanna hjálp. Sum blaðstjóri vónar forkvinnan, at limir eisini vísa blaðnum áhuga, og øll eru vælkomin at senda inn tilfar ella at seta seg í samband við felagið, soleiðis at greinar og samrøður kunnu framleiðast til komandi bløð.

Eitt temablað um forskúlar er á breddanum. Jústinus Ejdesgaard hevur m.a. skipað fyri einari Gallup kanning og viðgjørt ymisk viðurskifti um forskúlar í Føroyum; og hetta tilfarið verður samlað í eitt temablað, sum verður sent øllum limum.

## Heimasíðan og Globi

Miðlar eru takksom amboð, tá samskiftast skal skjótt og við nógv fólk í senn. Heimasíðan www.pedagogfelag.fo skal mennast og gerast alsamt meira áhugaverd. Kannað verður, hvussu Føroya Pedagogfelag kann fáa eina betri samskipan millum Pedagogblaðið, heimasíðuna og miðlaumrøðu sum

heild. Tað er torført at fáa tað pláss, okkum tørvar í almenna kjakinum, og arbeiði við at finna røttu loysnina á hesum heldur fram.

Globi skipanin virkar væl og verður nógv brúkt, tá boð skulu út til limirnar. Globi skipanin verður brúkt undir samráðingum, til fundir og tiltøk og at vísa til boð á heimasíðuni. Tað er umráðandi, at felagið støðugt fær telefonnummar, teldupostbústaðir og broytingar sum heild sendar frá limunum, so okkara data støðugt verða dagførd.

## Dagstovnaøkið

Mentamálaráðið er avvarðandi myndugleiki á Dagstovnaøkinum. Mentamálaráðið bjóðaði Føroya Pedagogfelag við í eitt samstarvsráð saman við Kommunufeløgunum, har endamálið var at umrøða dagstovnaøkið og tey viðurskifti, sum har eru galdandi. Somuleiðis fekk Føroya Pedagogfelag tvey umboð í einum arbeiðsbólki, sum skal endurskoða Dagtovnalógina. Hvørki av hesum arbeiðum eru farin í gongd, og tað er beinleiðis lagt upp til, at felagið ikki skal luttaka í hesum báðum bólkum. Orsøkin sigst verða, at tann, sum skal gjalda, eisini skal valda. Nevndin hevur yvir fyri landsstýriskvinnuni við Mentamálum gjørt vart við, at tað er neyðugt, at felagið luttekur í tílíkum arbeiði, tí felagið umboðar starvsfólkini og hevur eisini fakliga kunnleikan á økinum. Nevndin heitir tí á landsstýriskvinnuna um at seta hetta arbeiðið í gongd skjótast gjørligt.

## Uppskot til hoyringar

Føroya Pedagogfelag hevur fingið nøkur uppskot til hoyringar frá m.a. Mentamálaráðnum. Talan er um uppskot til hoyringar av m.a. lóg um forskúlar, dagstovnalógini, námsfrøðislig stevnumið v.m. Felagið hevur gjørt var við, at freistin at svara tílíkum hoyringsuppskotum er alt ov stutt, og at ein avleiðing av stuttu svartíðini skapar ótryggleika um góðskuna av møguligum lógarbroytingum, ella at tað beinleiðis førir við sær, at skeivar avgerðir verða tiknar. Felagið er av teirri fatan, at alt lógararbeiði er sera týdningarmikið, og at tað tískil eigur at fáa ta viðgerðartíð, sum er neyðug til tess at tryggja góðskuna.

## Forskúli

Fjølmiðlarnir og Skúlablaðið hava varpað ljós á leiðsluviðurskiftini í Skúlaspíranum í Leirvíkar skúla. Fundir hava verið millum Eysturkommunu, Føroya Lærarafelag, starvsfólk í Skúlaspíranum og Pedagogfelagið. Nógv fjølmiðlaumrøða hevur verið um forskúlan, og hóast tað, so hevur tað ikki eydnast at finna nakra skilagóða loysn. Tað er áhugavert, at kommunur taka stig til at fremja verkætlanir, sum skapa nýhugsan, men Føroya Pedagogfelag vil staðiliga heita á kommunur um at virða tey fakfelagsligu viðurskiftini, sum longu eru galdandi á einum starvsøki, áðrenn tílíkar verkætlanir verða settar í gongd. Felagið finnur seg ikki í politiskari uppíblanding, sum setur til viks galdandi lógarásetingar og sáttmálaviðurskifti. Leiðslu- og starvsviðurskiftini í Skúlaspíranum eru viðurskifti, sum sáttmálapartarnir eiga at loysa í felag. Pedagogar hava ein serligan fakligan kunnleika og eiga undir ongum umstøðum at virka sum hjálparfólk hjá lærarum ella hjá einari skúlaleiðslu. Samstarv er uttan iva besta loysnin, og tað kjakið hoyrir heima millum feløgini.

## Nærverkið

Álvarsligar sparingar vóru framdar í Nærverkinum, hetta hóast Nærverkið frammundan hevði lagt fram rúgvismikið tilfar um stóra tørvin á starvsfólkum komandi árini. Ein avleiðing av hesum sparingum er, at ein leiðari er settur fyri fleiri stovnar. Tað hevur víst seg ikki at vera so einfalt at leggja fleiri eindir undir somu leiðslu. Starvsfólk gera vart við, at tey mangla dagligu leiðsluna á staðnum og gera vart við, at heldur eingin varaleiðari er á stovnunum.

Sparingarnar hava ført við sær, at starvsfólk í størri mun arbeiða einsamøll. Hetta metir felagið er beinleiðis við til at skapa strongd og ótryggleika millum starvsfólk. Nærverkið hevur í fleiri ár verið fyri stórum sparingum, og Føroya Pedagogfelag metir, at nú má landsstýriskvinnan í Almannamálum taka ábyrgd av hesum sparingum og fáa økið uppá rættkjøl aftur. ST-sáttmálin fyri fólk sum bera brek, hevur heilt greiðar ásetingar um, hvørji rættindi fólk við breki hava, og tað er torført at ímynda sær, hvussu hesi mál verða rokkin við núverandi normeringum.

## Børn og ung

Økið Børn og ung er enn ikki komið í eina fasta legu. Slóðin, sum var niðurløgd, og sokallaði „Nýggi stovnurin" eru ikki endurskipað eftir teimum ætlanum, sum vórðu lagdar fram. Felagið stendur undrandi yvir fyri hesum, ásannandi, at Føroyar júst nú hava verið til próvtøku hjá ST. Lítil og eingin umrøða hevur verið av hesi próvtøku, sum ístaðin fyri eitt 13-tal gav Føroyum dumpi karakter. Kunnu vit liva við tí, er spurningurin, og hava børn við serligum tørvi ikki uppiborið eitt 13-tal? Eingin ivi er um, at starvsfólkini gera sítt arbeiði til lítar, men við ongum politiskum visjónum og ongum yvirskipaðum ætlanum um at tryggja øllum børnum og ungum teirra rættindi sambært Barnarættindasáttmálanum, so mugu børn og ung í Føroyum liva við einum vánaligum ummæli.

## Pedagogútbúgvingin

Fleiri nýggir pedagogar hava júst nomið sær prógv. Nýggja pedagogútbúgvingin er í gongd, og í framtíðini verða allir pedagogar bachelorar. Tað er eitt framstig, at útbúgvingin verður ment, og er tað í tráð við politisku ætlanirnar um at uppraðfesta pedagog- og lærarаútbúgvingarnar. Eftir stendur so spurningurin um, hvussu hesir nýggju bachelorpedagogar og -lærarar skulu lønast. Á fundi við tey lesandi vóru formaðurin í Føroya Lærarafelag og forkvinnan í Føroya Pedagogfelag biðin um at fáa hesi viðurskifti uppá pláss áðrenn lokna útbúgving.

## Samstarv og samskifti

Nevndin í Føroya Pedagogfelag fegnast um tey viðurskifti, sum eru ment á pedagogiska økinum og heitir inniliga á politisku myndugleikarnar um at taka øll faklig og bygnaðarlig viðurskifti upp við felagið. Felagið er til reiðar at samskifta og samstarva við avvarðandi myndugleikar um pedagogiska fakið, arbeiðsviðurskifti og um avleiðingar av teimum broytingum, sum alsamt fara fram á økinum. Føroya Pedagogfelag vil spæla við – men tá tað er neyðugt, standa vit ímóti!

*Við vón um góða undirtøku ynskist øllum limum ein góðan aðalfund!*

## GUÐRUN EYSTURLÍÐ, VALEVNI:
# LØNIN HEVUR IKKI FYLGT VIÐ



*Guðrið Eysturlíð hevur, umframt pedagogiska grundútbúgving, eina hægri útbúgving,- eina master í sosialpedagogikki frá DPU.*
*Guðrun starvast sum námsfrøðiligur rágevi í Barna- og ungdómsdeildini hjá Tórshavnar Kommunu.*

Grundleggjandi í einum fakfelagsskapi er, at allir limir kenna seg sum ein part í felagsskapinum, kenna á sær, at sjónarmið teirra verða hoyrd, og at teir fáa ta hjálp og vegleiðing, teimum tørvar. Pedagogfelagið eigur ikki at vera nakað undantak.

Hóast lítil orsøk er at ivast í, at tey, sum hava staðið og nú standa á odda fyri felagnum, sum nevnd ella umsiting, royna at gera sítt besta, er altíð soleiðis, at okkurt kundi verið gjørt enn betur. Her hugsi eg um, at fjarstøðan millum limir og nevnd ivaleyst kundi verið styttri, sum hevði verið til gagns fyri allar partar. Havast má altíð í huga, at gjøgnumskygdar avgerðir og mannagongdir eru treyt fyri áliti millum limirnar.

Pedagogarbeiði er eitt av serkendu kvinnufakunum, har størsti parturin av starvsfólkunum arbeiða niðursetta tíð. Tað er ikki av teirri orsøk, at lønin er so mikið góð, at skerd arbeiðstíð gerst lokkandi, men heldur tað, at fult vikutímatal er ov møtumikið fyri flestu limir. Pedagogiska arbeiðið er eitt starv, at skal tað gerast til lítar, krevst nógv fyrireikingartíð. Ynskiligt hevði tí verið, at í minsta lagi ¼ av arbeiðstíðini verður roknað sum fyrireikingartíð, sjálvandi uttan lønarmiss. Pedagogarbeiðið er víðkað nógv seinastu árini, men hvørki løn ella virðing fylgir við.

Millum tær uppgávur, sum Pedagogfelagið eigur at leggja serliga stóran dent á, er at fáa í lag eina miðvísa eftir- og víðariútbúgving, og at eitt støðugt innanhýsis orðaskifti fer fram um innihaldið á pedagogstarvinum.

---

## JANNIE S. JACOBSEN, VALEVNI:
# ÚT VIÐ STRONGDINI OG ÓNØGDSEMINUM
## – INN VIÐ FØRLEIKANUM OG FYRIREIKINGARTÍÐINI!



*Jannie Jacobsen starvast sum hjálparfólk við pedagogiskari ábyrgd. Jannie hevur 10 ára starvsroyndir og hevur virkað sum álitisfólk í 4 ár.*

Eg eiti Jannie Sofía Jacobsen, og eg eri 35 ára gomul. Eg havi starvast sum hjálparfólk í føstum starvi í Býlingshúsinum millum Gilja við námfrøðisligari ábyrgd síðan 2004. Harumframt havi eg verið álitisfólk síðan 2007. Samanlagt havi eg starvast 10 ár á økinum.

Eftir at hava starvast sum hjálparfólk við námsfrøðisligari ábyrgd í nógv ár, eru nógv viðurskifti á økinum, eg meti hava tørv á at verða dagførd og broytt til tað betra. – Hetta er eisini orsøkin til, at eg velji at stilla upp til nevndarvalið.

Eins og eg brenni fyri mínum starvi, sum eg var væl vitandi um, ikki var eitt starv, sum var allarbest lønt, hevur nevndararbeiði eisini mín stóra áhuga. Tað er á hesum øki, neyðugu broytingarnar til tað betra verða framdar. – Og eg vil fegin vera við til at arbeiða við og fremja hesar broytingar.

Fyri at nevna nøkur av teim týðningarmestu orsøkunum til hví nevndararbeiði hevur mín stóra áhuga kann eg byrja við at nevna, at ein av ábyrgdin hjá nevndini er at rógva framm ímóti, at arbeiðstíðin og byrðan verður løgd á ein slíkan hátt, at arbeiðfólkið, og harvið børnini, sum vit hava ábyrgdina av, uppliva ein arbeiðs/gerandisdag uttan strongd og ónøgdsemi. Um hesi viðurskifti skulu broytast, krevjast sáttmálabroytingar í mun til hjálparfólkini. M.a er eitt av týðningamestu málunum tað, at hjálparfólk á dagstovnum skulu lønast eins og hjálparfólk á bústovnum.

Haravtrat meti eg, at hjálparfólk á dagstovnum als ikki hava nóg góðar sømdir í mun til fyrireiking, eftirmetingar, foreldraprát v.m.. Hetta eru viðurskifti, sum eru við til at lække støðið á tí arbeiði vit eiga at útinna. – Arbeiði, vit eru sett til at fremja. Arbeiði vit fáa løn fyri at fremja.

Í verandi løtu, hava hjálparfólk við og uttan námsfrøðisligari ábyrgd ikki fyrireikingartímar íroknaðar í teirra sáttmála, eins og útbúnu námsfrøðingarnir hóast alt hava tað. Avleiðingarnar av hesum eru m.a. tær, at vit ikki í nóg stóran mun megna at nøkta tørvinar og støðugt vaksandi krøvini frá foreldrum og leiðslu.

Umframt hesar broytingar, meti eg, eins og eg gjørdi í fjør, tá eg stillaði upp, at tað er alneyðugt við eini grundútbúgving til hjálparfólkið á stovnunum kring landið. Um ein slík útbúgving var eitt tilboð, helst eitt krav, hevði hetta fakliga grundarlagið verið viðvirkandi til at givið hjálparfólkinum eina kenslu av, at vit stóðu sterkari og stinnari í mun til okkara arbeiði, og ikki minst í mun til tær avbjóðingar, arbeiði setur. Avbjóðingar, sum gerast størri og størri, eins og arbeiðsbyrðan ger tað. Á persónliga økinum, hevði henda útbúgving givið hjálparfólkinum eitt støðugt, trygt grundarlag at staðið á. Hetta hevði vónandi harvið havt við sær, at einstaka hjálparfólkið fekk betur sjálvsálit og integritet, hvørt síðan sjálvsagt hevði stevnt arbeiði hjá viðkomandi móti eini jaligari kós.

# ELIN NORÐBERG WENNINGSTED TAUSEN, VALEVNI:
# SJÓNLIGAR LIMIR OG FELAG



*Elin N. W. Tausen hevur starvast á dagstovuni í Løkjutúni síðani 2010 og er nú leiðari árið út. Elin er nevndarlimur í løtuni*

Eg eri útbúgvin námsfrøðingur á Føroya Lærarskúla í 2008. Eg havi, síðan eg var útbúgvin, arbeitt sum námsfrøðingur á Dagstovninum í Løkjatúni. Síðani desember 2010 havi eg verið virkandi leiðari í Løkjatúni, meðan leiðarin er í farloyvi fram til 31.12 2011. Eg havi nú í tvey ár á rað verið fyrstvaldi eykalimur, og í tí sambandi havi eg sitið í nevndini í tvey longri tíðarskeið. Eg havi hetta tíðarskeiðið sitið í nevndini síðani oktober 2010.

Eg havi valt aftur at bjóða meg fram sum valevni til nevndina, tí nevndararbeiði er nakað, ið eg havi stóran áhuga fyri. Hóast tað til tíðir kennist sum ein krevjandi uppgáva, so er tað ein bæði spennandi, gevandi og mennandi uppgáva at arbeiða fyri at bøta um arbeiðsumstøðurnar hjá limum felagsins og fyri at gera okkara fakøki sjónligt í samfelagnum. Tað, at eg saman við nevndini havi verið við til samráðingarnar í 2010, hevur givið mær vitan og royndir, sum kunnu vera ein styrki hjá felagnum til komandi samráðingar í heyst, og tí bjóði eg meg fram aftur at vera við til at arbeiða fyri einum betri sáttmála fyri okkara limir.

Tað, eg havi upplivað sum nevndarlimur, er, at frástøðan til limirnar kennist stór, og eg ivist ikki í, at limirnir eisini uppliva nevndina langt burtur. Tí er eitt av mínum hjartamálum at fáa limir meira virknar í felagnum. T.d. við at skipa fyri kjakfundum millum limirnar um ymisk evni, sum røra seg á okkara fakøki, seta arbeiðsbólkar innan ávís evni, sum skulu virka sum sparringspartar hjá nevndini; og hesar bólkar kunnu vera við til at varpa ljós á okkara fakøki við at taka aktivt lut í samfelagskjakinum.

Vit eru eitt av størstu fakfeløgum í landinum, og vit hava fleiri limabólkar innan fyri felagið. Vit hava nú í umleið tvey ár havt eitt leiðararáð, og við teimum royndum, vit hava gjørt har, haldi eg, at tíðin er komin til, at vit fáa eitt pedagográð og eitt hjálparfólkaráð, soleiðis at allir bólkar uppliva seg umboðaðar á jøvnum føti. Hesi ráð kunnu eisini vera ráðgevandi hjá nevndini í málum sum viðvíkja teirra limabólki. Á tann hátt kunnu limirnir kenna seg betur umboðaðar í felagnum.

Eg haldi, at vit sum fakbólkur eru alt ov ósjónlig í samfelagskjakinum, og hetta skulu vit gera nakað við, tí vitan kemur av upplýsing. Hetta er ein uppgáva, sum vit øll eiga saman við nevndini! Men eg skilji væl, at tað kann vera torført at tora at taka lut í almenna samfelagskjakinum, men her haldi eg, at áðurnevndu bólkar og ráð kunnu vera ein styrki til at koma við sínum íkasti til samfelagskjakið og á tann hátt vera við til at varpa ljós á tað týdningarmikla arbeiðið, námsfrøðingar útinna í føroyska samfelagnum.

Vit skulu hava sjónligar limir – og eitt sjónligt og sterkt fakfelag!

---

# JÓGVAN PHILBROW, VALEVNI:
# NÓGV EFTIR ENN



*Jógvan Philbrow gjørdist námsfrøðingur í 2002. Jógvan er leiðari á Kambi í Fuglafirði og næstformaður í Føroya Pedagogfelag.*

Sum persónur havi eg altíð havt hug at ávirka heimin, eg livi í. Tí er hugurin at arbeiða innan fakfelagið so stórur.

Nógvir stórir spurningar eru uppi at venda fyri tíðina – spurningar, sum koma at ávirka námsfrøðiliga heimin í stóran mun. Eitt nú er „Skúlaprosjektið“ – „Skúlaspírin“ hjá Eystur Kommunu framvegis á breddanum, og tað hevur týdning, at vit sum felag fylgja við og gera okkara ávirkan galdandi. Ætlanir, ið ein einstøk kommuna hevur, kann hava stórar fylgjur fyri alt tað námsfrøðiliga økið kring landið.

Dagstovnalógina verður „pjøssað“ uppá í hesum døgum – ein ætlan var, at hon skuldi endurskoðast, men hesum settu kommunufeløgini seg móti – og tað tykist, sum um hetta arbeiðið er slept. Hetta kann felagið ikki liva við, samstundis sum ymiskar broytingar vera gjørdar inni í lóggávuni.

Eitt, sum kemur at fylla nógv í 2011, verða sáttmálasamráðingarnar – seinastu samráðingar settu sjøtul á eitt nýtt samstarv millum fakfeløgini, og havi eg verið virkin í hesum – mínar royndir frá hesum og samráðingunum undan teimum verða tí tiknar við aftur, verði eg afturvaldur á aðalfundinum.

Aðalmálið hjá mær er og hevur verið at fáa fyrireikingartíð inn í arbeiðstíðina hjá limum okkara. Vónandi fái eg tykkara stuðul til aftur at verða valdur í nevndina hjá Føroya Pedagogfelag.

# SÁTTMÁLI SAMEINDU TJÓÐA

## UM RÆTTINDI HJÁ EINSTAKLINGUM, IÐ BERA BREK, SAMANBORIN VIÐ ARBEIÐSHÆTTIR, IÐ ERU FRAMMI Í TÍÐINI



*Ingun Mohr Jacobsen*
*Námsfrøðingur og masterlesandi í sosialpedagogikki á DPU*

Hóast *Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek,* millum annað sigur*,* at brek skapast av forðingum, ið standast av hugburði, so er ymiskt, sum bendir á, at hugburðurin, sum býr undir nøkrum av arbeiðshættunum, ið eru frammi í tíðini, ikki samsvara við ásetingarnar í sáttmálanum.

Í Føroyum var Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, samtyktur í mai 2009. Samsvarar tað sosialpedagogiska arbeiðið við endamálið í hesum sáttmála, ella hongur tað meira tilvildarliga saman við, hvørji sjónarmið starvsfólkini hava til arbeiðið?

Í greinini verður hugt at, hvørji sjónarmið og hvørjir sosialpedagogiskir arbeiðshættir eru mest frammi í tíðini. Helvtin av hesum arbeiðshættunum taka støði í tí einstaklingavendu fatanini, hóast framtíðar politikkur í mun til fólk við breki sambært Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, tekur støði í relatiónsvendu fatanini.

### Hvat er brek?

Til er eingin ávís lýsing av hugtakinum brek. Tað er eitt hugtak, ið broytist alla tíðina í mun til t.d. søgulig, samfelagslig, mentanarlig, hugmyndafrøðilig ella læknafrøðilig viðurskifti ella rák. Í ritinum *Dansk Handicappolitik* verður hugtakið *brek* lýst soleiðis: *Heitið „brek" merkir missur ella avmarking av møguleikum at taka lut í samfelagslívinum javnbjóðis øðrum.* (Wiederholt, 2005).

Tað vanligasta virðisgrundarlagið ella fatanir, sum seta dám á tað sosialpedagogiska arbeiðið við fólki, ið bera brek, eru tær tríggjar fatanirnar: tann einstaklingavenda, tann relatiónsvenda og tann umhvørvisvenda. Tann umhvørvisvenda er ikki so kend hjá okkum; tí verða bert tær einstaklingavendu og relatiónsvendu fatanirnar viðgjørdar her.

### Áskoðanir á brek

**Tann einstaklingavenda fatanin** verður eisini nevnd tann virkisliga (funktionella) allýsingin ella tað medisinska modellið. Hendan fatanin er í tveimum. Øðrumegin er tann lívfrøðiliga, læknafrøðiliga (medisinska) fatanin, sum hevur við sær sjúkugreining og sjúkuviðgerð. Hin fatanin er tann virkisliga, har dentur verður lagdur á avmarkingarnar í førleikum hjá tí einstaka og á venjing, sum kann bøta um førleikan. Sjóneykan verður sett á forðingar, sum tann einstaki møtir vegna skerdar førleikar.

Funnist verður at tí einstaklingavendu fatanini, tí hon verður hildin at skilja og flokka brek sum frávik, avmarkingar og sorgarleik, og sum heild minni verd enn „tað normala". Eisini verður útgangsstøðið í ov stóran mun tikið í, hvat er „normalt". Harumframt verður funnist at hesi fatan, fyri at hon roynir at geva eina algongda og óvildiga allýsing av breki, sum ikki tekur við sjónarmiðini hjá persóninum við breki í mun til hansara upplivingar í lívinum, lívstreytir og ynski fyri lívið.

**Tann relatiónsvenda fatanin** verður eisini nevnd tann norðurlendska fatanin. Her verður hugtakið „brek" ikki sæð í mun til persónin, sum hevur skerdar førleikar, men í mun til tær støður, sum hann kemur í, har forðingar standast av umhvørvi og hugburði. Heldur enn at lýsa ein *eginleika*, lýsir hugtakið „brek" her eina *støðu*.

Í tí relatiónsvendu fatanini er sostatt ikki bert talan um eina einstaklingavenda fatan av avmarkingum í førleikum.. Harafturímóti hevur tað nógv at siga, um umhvørvið er til vildar ella ikki. Brek valdast, og tað er ikki fyrst og fremst ein persónligur eginleiki ella avmarking, men tað kann tað blíva í óhóskandi umhvørvi. Tað hevur nógv at siga, at starvsfólkini ikki eru serfrøðingar í lívinum hjá persóninum við breki, men samstarvsfelagar, sum virkin royna at skapa umstøður fyri at stuðla og fremja tað, sum persónurin við breki sjálvur velur.

**Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek** varð samtyktur í Føroyum í mai í 2009. Sáttmálin hevur í innganginum hesa lýsing av hugtakinum brek. At limalondini (*e*) *viðurkenna, at brek er hugtak í broyting, og at brek er úrslit av sínámillum ávirkan millum fólk, sum eru viknað, og forðingar, ið standast av hugburði og umhvørvi, sum tarnar teimum til fulnar og á virknan hátt at verða við í samfelagnum javnbjóðis øðrum.*

Við hesum kann staðfestast, at framtíðar altjóða politikkur, tá tað snýr seg um brek, tekur støði í relatiónsvendu fatanini.

### Pedagogiska arbeiðið í mun til sáttmálan

Tann einstaklingavenda og tann relatiónsvenda fatanin vísa til ávísar hættir og sjónarmið í arbeiðinum við persónum við menningartarni. Niðanfyri vil eg í stuttum vísa á, hvat býr undir nøkrum av teimum arbeiðshættum, sum í dag verða nýttir á stovnum fyri menningartarnað í Føroyum og Danmark. Arbeiðshættirnir eru: **ADL, Marte Meo, Miljøterapi, Teacch, Neuropedagogikkur og Relatiónspedagogikkur.**

**ADL – Vanligur gerandis lívsháttur:** ADL venjing er ein stytting av danska *Almindelig Dagligdags Levevis,* sum er ein røð av virksemi, ið verður útint dagliga á ein vanabundnan hátt á teimum einstøku bústøðunum. Virksemið verður systematiserað og er ymiskt alt eftir, hvørjum menningarstøði viðkomandi persónar er á. Endamálið er at menna, stuðla og venja ymiskar førleikar við tí fyri eyga at gerast meira sjálvhjálpin. Virksemið kann vera: eta og drekka, lata seg í og úr, reinføri,


*Verkstaðurin á Bakka í Vági*

matgerð, reingerð, keypa, vaska klæðir, rudda o.s.fr.

*Betegnelsen Marte Meo betyder „ved egen kraft“. Betegnelsen refererer til og gengiver en tro på at alle har potentialer i sig til at udvikle kommunikationen i samspil med andre. Vi har alle naturlige samspilskompetencer som vi ved at identifisere og fokusere på kan udvikle, såvel hos os selv som hos de mennesker vi omgiver os med.*

**Marte Meo** merkir „við egnari megi“. Arbeiðshátturin er grundaður á stuðlandi menning í samskiftinum. Hátturin vísir til og førir fram, at øll hava natúrligar førleikar í sær at menna samskiftið í samspæli við onnur, bæði búfólk og starvsfólk. Tað snýr seg um at fáa fatur á hesum førleikum og harvið menna tað, sum mennast kann í samskiftinum hjá báðum pørtum. Video verður brúkt sum arbeiðsamboð. Videoupptøkur og greiningar av samanspælinum í gerandis støðum skapa møguleikar fyri at síggja t.d. sosialar førleikar og hvat búfólkini taka stig til, og hiðani seta nýggj mál fyri gagnligari menning og samanspæli. Meginreglan er, at trupulleikar í atburði aloftast eru eitt aftursvar upp á óheppið samanspæl.

**Miljøterapi** er grundað á ymisk sálarfrøðilig ástøði. Skilt verður millum sálargreinandi og innlæringarsálarfrøðiligar hættir. Í tí fyrra verður dentur lagdur á relatiónir millum starvsfólk og búfólk, meðan denturin í tí seinna verður lagdur á innlæring av sosialum førleikum. Hvussu hetta verður tillagað í verki, veldst um, hvør málbólkurin er. Viðgerðin er at læra dagligar neyðugar førleikar, t.d. lata seg í, gera mat, vaska sær. Á heimasíðuni hjá einum bústovni verður pedagogikkurin m.a. lýstur soleiðis: *Umhvørvið skapar møguleikar fyri, at búfólkini kunnu mennast innan fyri skipaðar karmar. Viðurkennandi pedagogikkur verður brúktur. Umhvørvið er merkt av at rúma ymiskleika, av umsorgan, virðing og samanhangi. Búfólkini og starvsfólkini seta mál út frá virkisætlanum.*

**Teacch:** Viðgerðin er vend móti atburðinum og atferðini hjá tí einstaka og er eyðkend av serundirvísing og skipaðum pedagogikki og atburðarviðgerð. Hesin arbeiðshátturin hevur verið ein av hornasteinunum í viðgerðini av autismu í t.d. Danmark og Føroyum.



*Verkstaðurin á Bakka í Vági*

Teacch miðar eftir, at búfólkini gerast sjálvstøðug. Skipaður pedagogikkur í Teacch-ætlanum tekur støði í innihaldsríkum og týðandi vanum og sjónvendum stuðli, soleiðis at persónurin so við og við lærir at klára seg við minni stuðli frá starvsfólki.

**Neuropedagogikkur** er læran um sambandið millum heilan og atburð/atferð. Við neurosálarfrøðiligum kanningum og eygleiðingum verða sterku og veiku síðurnar avdúkaðar á økjum sum uppmerksemi, samskifti, minni og sosialir førleikar. Málið er at lýsa, bæði hvat persónurin dugir, og hvussu hann ger tað, so tað gerst týðiligt, hvat virkar, og hvat er skatt. Síðani verður dagurin lagdur til rættis á ein slíkan hátt, at persónurin fær gagn av sínum sterku síðum, meðan starvsfólk ella skipan verða sett í staðin, har hann er veikur. Á heimasíðu lýsir eitt av bústøðunum arbeiðsháttin soleiðis: *Endamálið er at venja og øva, so tað kanska ber til at viga upp ímóti nøkrum av teimum trupulleikum, sum standast av, at heilin partvís ikki virkar, sum hann skal. Neyðugt er við skipan í gerandisdegnum.*

**Relationspedagogikkur** tekur støði í einum systemiskum og psykodynamiskum hugsunarhátti. Ástøðið um týdningin av relatión er grundað á ta fatan, at øll eru fødd sosial og motiverað fyri felagsskapi og samskifti við onnur. Í relatiónini mennast báðir partar (starvsfólk og persónurin við breki). Tað hevur við sær, at samstundis, sum ein tekur støðu til sín sjálvs, skal ein eisini taka støðu til sambandið, ein hevur við tey rundan um seg. Relatiónspedagogikkur byggir á eina subjekt-subjekt fatan, og menningartilgongdin er støðug. Lyklaorðini eru viðurkenning, at rúma, nærleiki, innliving, avmarking og ymiskleiki. Menningartarn er nakað, sum einstøkum menniskjum er fyri í ávísum viðurskiftum.

## Fýra lyklaorð

Í frágreiðingunum um teir seks arbeiðshættirnar og sjónarmiðini eru tað serstakliga fýra lyklaorð, sum koma fyri: **sjálvbjargni, ávirkan, skipan og relatiónir.** Niðanfyri verða tey fýra lyklaorðini sett í samband við orðingar, sum verða brúktar í lýsingunum av teimum seks arbeiðshættunum og sjónarmiðunum: *sí tabel 1, síðu 34.*

Um hugt verður at talvuni, kunnu vit staðfesta, at arbeiðshættir, sum taka støði í einstaklingavendu fatanini, verða nógv nýttir. Havast skal í huga, at tað altíð er

ein vandi í at koyra í kassar, og at allur sannleikin ikki kemur fram. Har eg havi sett arbeiðshættirnar og sjónarmiðini, er har, sum tey hella mest til. Í øðrum høpi verður Miljøterapi, serstakliga tá tað snýr seg um autismuøkið, sett undir einstaklingavendu fatanina, og á sama hátt sum at Neuropedagogikkur verður mettur meir til relatiónsvendu fatanina.

ADL, Teacch og neuropedagogikkur eru meinlíkir arbeiðshættir. Teir taka støði í tí einstaklingavendu fatanini og hava hugtøk sum sjálvbjargin, sjálvstøðug, sjálvhjálpin, venja og øva. Í sjálvum sær er sjálvbjargni ikki neiligt, men spurningurin er, hvat sjálvbjargni skal nýtast til, um tað ikki er til at fáa ávirkan á sítt egna lív. Sum útgangsstøði kann sigast, at relatiónspedagogikkur skilur seg frá ADL, Marte Meo, Miljøterapi, Teacch og neuropedagogikki við ikki at vera leiðbeinandi. Í relatiónspedagogikki er relatiónin eitt mál í sær sjálvum.

Tað, sum eisini eyðkennir ADL, Teacch og neuropedagogikk er, at dentur verður lagdur á tað, sum manglar. Tað snýr seg um menningartarnið, har tað er tann menningartarnaði og tær avmarkingar, sum hann hevur, sum eru trupulleikin. Miljøterapi, Marte Meo og relatiónspedagogikkur leggja afturímóti dent á ávirkan, og her er tað tann relatiónsvenda fatanin, sum ger seg galdandi. Starvsfólk eru ikki serfrøðingar í lívinum hjá øðrum, men samstarvsfelagar.

## Áskoðan á brek sammett við sosialpedagogiskt arbeiði

Niðanfyri verða arbeiðshættir og sjónarmið sammett við hugsjónir, mál, áskoðan á menningartarnað og starvsfólk umframt hvør tað er, sum hevur valdið. Somuleiðis verða arbeiðshættirnir settir í samband við fatanir av breki. *Sí tabel 2, s. 34.*

Sum sæst, eru tað bæði tann einstaklingavenda og tann relatiónsvenda fatanin, sum verða nýttar í sosialpedagogiska arbeiðinum. Helvtin av teimum nýttu arbeiðshættunum taka støði í tí einstaklingavendu fatanini, hóast framtíðar politikkur í mun til fólk við breki sambært *sáttmála sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek* tekur støði í relatiónsvendu fatanini.

Tann einstaklingavenda fatanin á brek setir einstaklingin í miðdepilin og savnar seg um, hvussu persónurin við skerdum førleika kann fáa hjálp og stuðul til sum frægast at laga seg eftir teimum umstøðum, sum eru. Hugmálið (idealið) er normalisering, og málið í sosialpedagogiska arbeiðinum er sjálvbjargni og venjing. Tað er tann, ið ber brek, sum er objektið, og starvsfólkið, sum er subjektið við sínum fakligu førleikum. Teir arbeiðshættir, sum í hesum føri verða nýttir til at bøta um og laga seg teimum givnu umstøðunum eru ADL, Teacch og neuropedagogikkur.

> *Hóast Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek tekur støði í relatiónsvendu fatanini, so er tað líka so vanligt, um ikki vanligari, at støði verður tikið í einstaklingavendu fatanini í dagliga arbeiðinum á stovnum.*

Tann relatiónsvenda fatanin setur sosialar skipanir í miðdepilin og roynir miðvíst at beina virksemið á ta leiðina. Í Miljøterapi gera bæði tann einstaklingavenda og tann relatiónsvenda fatanin seg galdandi. Hugmálið er bæði normalisering og lívsvirði, á sama hátt sum málið bæði er viðgerð og samskifti. Í relatiónspedagogikki er tað relatiónsvenda fatanin, tað snýr seg um. Hugmálið er lívsvirði, og málið er relatión og samskifti.

## Niðurstøða

Hóast *Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek* tekur støði í relatiónsvendu fatanini, so er tað líka so vanligt, um ikki vanligari, at støði verður tikið í einstaklingavendu fatanini í dagliga arbeiðinum á stovnum. Hví so er, kann snúgva seg um vanahugsan, at starvsfólk sjálv eru meir ella minni eitt úrslit av teimum arbeiðshættum ella tí virðisgrundarlag, sum kann samanberast við ta einstaklingavendu fatanina. Eisini snýr tað seg um ta fakligu siðvenjuna, sum starvsfólk hava verið ein partur av, t.v.s. atburðarviðgerð. Í dagliga arbeiðinum skal man ikki undirmeta ta hjálp, ein ávís skipan av degnum kann hava, men skipan má bara ikki virka sum ein varandi fyriskipan. Umráðandi er at hugsa um, hvørjar royndir tí einstaka tørvar fyri at ávirka sína egnu tilveru og fáa ávirkan á egið lív. Hvør orsøk er til at gerast sjálvbjargin, og hvat skal tað brúkast til, um ein samstundis onga ávirkan hevur á tað, sum gongur fyri seg rundan um seg? Einki er at ivast í, at fatan og hugburður hjá starvsfólki av sínum arbeiði í sambandi við fólk við menningartarni hevur stóran týdning fyri, hvussu gerandislívið hjá búfólkunum verður lagt til rættis, skipað og livað, eins og tað hevur týdning fyri teir karmar, sum verða skaptir í sambandi við samskifti og ávirkan. So fyri starvsfólk snýr tað seg um at venda vanahugsan baki og ikki stirðna í handahógvsarbeiði.

## Bókmentir:


Askheim, O. P. (2008): *Fra normalisering til empowerment*. Gyldendal Akademisk

- Holst, J. (2009): Kommunikation og hverdagslivets rammer. *Tidsskrift for Socialpædagogik nr. 23*
- Jensen B. B. et al (2009): *Handicap som krydsfelt*. Videnscenter for Bevægelseshandicap.
- Kirkebæk, B. (2010): *Almagt og afmagt.* Akademisk forlag
- Lorentzen, P. (2003): *Fra tilskuer til deltaker,* Universitetsforlaget
- Ritchie, T.(red.), (2004): *Relationer i teori og praksis,* Billesø og Baltzer
- Rough, P. (2002): *Marte meo i praksis – Bedre samspil ved egen kraft.* Socialpædagogisk Bibliotek
- Söder, M. (2000): *Relativism, konstruktivism og praktisk nytta i handicappforskningen* Gyldendal Akademisk
- Wiederholt, M. (2005): *Dansk handicappolitik grundprincipper.* Det Centrale Handicapråd

Sáttmáli sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek
www.centerforautisme.dk
www.denstoredanske.dk
www.tilbudsportalen.dk

TABEL 1

| | Sjálvbjargni | Ávirkan | Skipan | Relatión |
|---|---|---|---|---|
| **ADL** | menna, stuðla fyri at gerast meira sjálvbjargin | | virksemið verður systematiserað | |
| **Marte Meo** | stuðlandi menning í samskiftinum | búfólkini taka stig til | | menna samskifti í samspæli við onnur |
| **Miljøterapi** | innlæring av sosialum førleikum | búfólkini og starvsfólkini seta mál | mennast undir skipaðum karmum | brúktur verður viðurkennandi pedagogikkur |
| **Teacch** | gerast sjálvstøðug, klára seg uttan starvsfólk | | skipaður pedagogikkur | |
| **Neuropedagogikk** | venja og øva | | ... skipan í gerandisdegnum | |
| **Relatiónspedagogikk** | ábyrgd av egnum lívi | báðir partar mennast | arbeitt verður við karmum og skipan av egnum lívi | relatiónir til netverk |

TABEL 2

| | ADL / Teacch / Neuropedagogikkur | Miljøterapi / Marte Meo | Relatións-pedagogikkur |
|---|---|---|---|
| **Áskoðan á brek** | Einstaklingavend fatan | Einstaklingavend- / Relatiónsvend fatan | Relatiónsvend fatan |
| **Hugsjón** | Normalisering | Normalisering / Lívsvirði | Lívsvirði |
| **Mál/endamál** | At gerast sjálvstøðugari /venjing í at klára seg | Viðgerð / Samskifti | Relatión / Samskifti |
| **Áskoðan á búfólk** | Objekt | Objekt / Subjekt | Subjekt |
| **Áskoðan á starvsfólk** | Fakligir førleikar | Fakligir /menniskjaligir førleikar | Menniskjaligir førleikar |
| **Avgerð og vald** | Starvsfólk | Starvsfólk og búfólk | Búfólk og starvsfólk |



Hildur Patursson
Master of Education

# MILLUMLANDA SAMSTARV UM BARNAGARÐS-ARBEIÐI Í NÁTTÚRUNI

*Spennandi samstarv er komið í lag millum barnagarðar í Havn, Reykjavík og Maniitsoq. Úr Føroyum luttekur Býlingshúsið á Norðasta Horni.*

*„Hvat eta trøini?“ vildu børnini fegin vita. Børnini hava nógvar forvitnislig-ar spurningar, sum hava samband við náttúruna.*

Samstarvið á smábarnaøkinum millum Maniitsoq, Reykjavík og Norðasta Horn er komið í lag við hesi yvirlýsing í huga.

Endamálið við hesum samstarvi er at kunna um tað arbeiðið, sum longu verður gjørt við børnunum úti í náttúruni, og at fáa royndir í lag við pedagogiskum menningar-arbeiði, so vit læra at troyta teir møguleikar betur, sum náttúran leggur upp til hvønn einasta dag í árinum. Saman kunnu vit hjálpa hvørjum øðrum til at kanna, hvussu vit best fáa pedagogiska dygd í tann gerandisdag, sum vit bjóða børnunum á stovnunum. Og fáa íblástur og menna tað pedagogiska arbeiðið saman.

Tveir pedagogar eru við á hvørjum stovni, og umframt at hava samband sínámillum við nútíðar tøkni er lagt upp til, at hesir pedagogar hittast og arbeiða eina viku

## FAKTA

ST hevur lýst tíggjuáraskeiðið frá 2005 til 2014 til at seta ljós á burðardygga menning á útbúgvingarøkinum, og eitt av høvuðshugtøkunum í hesum sambandi er lívlong læra, ella læra fyri lívið, sum meira beinrakið rakar hugsjónina og viljan aftan fyri átakið. Og í tí sambandinum hevur tað alstóran týdning, hvat vit leggja í beinini á okkara smáu líka frá barnsbeini.

Sambært UNESCO snýr útbúgving til burðardygga menning seg um at læra:

- at virða og virðismeta tey framstig, sum forfedrar okkara hava givið okkum, og taka undrini og menniskjuni í heiminum til okkara.
- at liva í einum heimi, har øll menniskju hava nóg mikið til matna,
- at sleppa at liva eitt sunt og virkið lív og halda eyga við, ansa eftir og bøta um støðuna á jørðini,
- at skapa og njóta ein betri, tryggari og rættvísari heim,
- at gerast hygnir borgarar, sum nýta síni rættindi og skyldur, har teir hava heima, í landi sínum og í umheiminum.



*Fyrireikandi kanningar til at gera brúgv um veitina*

á stovnunum hjá hvørjum øðrum, so teir á staðnum kunnu kanna, hvussu arbeitt verður har, seta ljós á hetta arbeiðið og hjálpa hvørjum øðrum at menna tað arbeiðið, sum gjørt verður á teimum ymisku stovnunum og tað ástøðiliga grundarlag, sum arbeiðið byggir á.

## Norðpluss-stuðul ger hetta gjørligt

Norðurlendska Ráðharraráðið vil birta upp undir, at tílíkt arbeiði verður gjørt. Tí letur Ráðharraráðið stuðul til tílíkt samstarv. Okkara samstarv er skipað sum samstarv millum kommunalu fyrisitingina hjá barangørðunum í Reykjavík og Mentamálaráðini í Grønlandi og her hjá okkum. Undirritaða, Hildur Patursson á Mentamálaráðnum, er samskipari av arbeiðinum við ábyrgd fyri Norðurlendska Ráðharraráðnum.

## Fyrsta vitjanin

Fyrst í november í ár vóru pedagogar frá barnagørðunum í Reykjavík og Maniitsoq á arbeiðsvitjan í eina viku í Býlingshúsinum á Norðasta Horni í Havn, har Malan Houmann og Elin Petersen tóku ímóti teimum og arbeiddu saman við íslendsku og grønlendsku pedagogunum. Í februar gongur leiðin til Reykjavíkar, og einaferð seinni hittast vit í Maniitsoq.

Eitt kvøldið vóru nakrir pedagogar á øðrum barnagørðum bodnir at koma at hoyra um arbeiðið og um teir ymisku stovnarnar saman við starvsfólkunum á Norðasta Horni.

Hetta var sera áhugavert at vera við til. Allir barnagarðarnir hava leingi gjørt nógv burtur úr náttúruni og eini burðardyggari mentan, og vónin er, at samstarvið millum londini fer at menna tað arbeiðið uppaftur meir.

Í Íslandi kunnu barnagarðar, men eisini aðrir stovnar, søkja myndugleikarnar um at fáa Grøna merkið (Græna fánan) sum vísir, at stovnurin ger serliga nógv burtur úr umhvørvisspurningum.

Nógv dømi vórðu nevnd frá øllum barnagørðunum um, hvussu tílíkt arbeiði verður gjørt í barnahædd. Eg skal bara nevna nøkur her og ætli at koma aftur, tá ið samstarvið er komið longur á leið.

Her eru nøkur dømi:

- Burturkast verður skilt, og tað, sum kann nýtast at gera mold burturúr, verður sankað í hóskandi íløt, har tað fær frið, til tað kann nýtast at seta niður í.
- Arbeitt hevur verið við gomlum og nýggjum vísum í samstarvi við eldri borgarar
- Tey høvdu eisini gjørt nakað burturúr at grava burturkast niður og so grava tað framaftur seinni, so børnini sóu, hvat ið molnaði, og hvat ið eingin munur sást á.
- Tey høvdu eisini vitjað á ruskplássum og sæð, hvar ruskið fer, og íslendingarnir nevndu, at teirra børn høvdu sæð, hvussu plastposar vórðu endurnýttir til flis, sum síðan varð seymað til jakkar.
- Í køssum við løgum av sandi og mold høvdu tey eisini sæð, hvussu týdningarmiklir reyðmaðkarnir eru fyri at halda moldina lætta og fruktagóða.
- Børnini vóru við til at planta og seta

runnar og trø niður, og tá var stuttligt og áhugavert at hoyra børnini m.a. spyrja um, hvat ið trøini eta.

Børnini í Býlingshúsinum á Norðasta Horni vóru sjálvandi eisini forvitin eftir at hoyra um og síggja myndir av, hvussu var í Íslandi og Grønlandi, og tey vistu ikki so lítið sjálv um ís og eldgos, ísbjarnir, hestar, stórhvalir og mangt annað forvitnisligt. Tað økir um forvitnið um londini hjá hvørjum øðrum.

Høvuðsdenturin varð lagdur á tað, sum børnini gjørdu, og nógv varð prátað um myndirnar, sum tey gjørdu.

Vit vaksnu høvdu eisini eina góða og kveikjandi viku og gleða okkum til annan part av framhaldssøguni, sum longu hevur verið, tá ið hetta kemur í blaðið.



*Pedagogarnir úr Gronlandi, Íslandi og Føroyum saman við børnunum. Tey hava arbeitt við føroyskum dansi og gjørt myndir til hvørt einstakt ørindi av Øskudølgi og Sópingarkonu. Myndirnar hanga nú á vegginum í Býlingshúsinum á Norðasta Horni*



# MENNING AV BARNINUM

*Beinta Nattestad skipar fyri skeiðum fyri dagrøktarar og starvsfólk á dagstovnum*

Undir heitinum „Menning av barninum" fór Beinta Nattestad, pedagogur, fyri trimum árum síðani undir at skipa fyri skeiðum, sum serliga vendu sær til starvsfólk, sum arbeiða í dagrøktini, og starvsfólk á dagstovnum. Hugskotið og orsøkin til, at hon fór undir hetta tiltak, var, at krøvini til dagstovnar og dagrøktarar eru munandi økt seinastu árini. Partvíst við Dagstovnalógini, sum vit fingu í 2000, og síðani Námsætlanunum. Samstundis hevur lítið verið hugsað um, at stórur partur av teimum, sum starvast á hesum økjum, als onga grundútbúgving hava. Hesi starvsfólk vita ikki altíð, hvussu tey skulu liva upp til hesar avbjóðingar, sigur Beinta.

– Vit eiga at gera okkum greitt, hvussu ovurhonds stór okkara ábyrgd er mótvegis teimum yngstu, og vit eiga tí at geva teimum, sum eru í dagrøkt ella á dagstovni, gott í beinið, t.d. styrkja teirra persónligheit og læra tey at vera í sosialum samanhangi o.a., so tey fáa eina góða byrjan til lívið og eru før fyri at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum lívið hevur at bjóða uppá gott og ilt, sigur Beinta og minnir á tær mongu vanlukkuligu hendingar, sum børnum kunnu vera fyri, tað verið seg insest og annað, og tá ræður um, at børnini hava uppbygt eitt álit á seg sjálv, so tey kunnu standa ímóti teimum keðiligu freistingum, sum lívið eisini hevur at bjóða.

Talan er um seks-daga skeið, sum Beinta skipar fyri. Fyrst tríggjar samanhangandi dagar, sum enda við, at luttakararnir fáa uppgávur heim við, og sum tey skulu loysa, til tey hittast aftur næstu skeiðsdagarnar. Royndirnar, sum Beinta higartil hevur gjørt sær, eru, at luttakararnir eru bæði dugnaligir og ídnir at nema sær kunnleika, og tí kann hon mangan undrast á, hví tey ikki hava tikið seg saman at nema sær eina útbúgving á økinum. Kanska tí at tey ikki rættiliga trúgva upp á seg sjálv og duga ikki altíð at seta orð á, og tað kann skeiðið geva teimum áræði til.

Áhugin fyri hesum skeiðum hevur verið eitt sindur ymiskur kring landið. At kalla allir dagrøktarar í Havn hava verið á skeið, og úr øðrum plássum hava teir eisini verið væl umboðaðir, men tá vit koma til starvsfólkini á dagstovnum hevur Havnin ikki verið so væl umboðað í mun til aðrar býir og bygdir. Orsøkin er ikki, at býtið millum hjálparfólk og pedagogar í Havn liggur nærri ásetingunum í dagstovnalógini, sigur Beinta, men veldst heldur um, í hvussu stóran mun leiðarar eggja sínum starvsfólkum at nema sær betri førleikar.

## Fyrstuhjálp í pedagogikki

Beinta vísir á, at eitt nú í Keypmannahavn krevja tey, at dagrøktarar og hjálparfólk á dagstovnum luttaka á einum tríggja viku skeiði skjótast gjørligt, eftir at tey eru sett í starv.

– Um talan skal vera um tríggjar vikur á skeiði, styttri ella longri, skal eg ikki siga, men tað tykir mær løgið, hvussu smá krøvini eru, sum sett verða til dagrøktarar og hjálparfólk. Kravt verður av øllum starvsfólkum á dagstovnum, at tey hava luttikið í fyrstuhjálparskeiði, og tað haldi eg eisini vera púra beint, men hví kravið ikki eisini fevnir um fyrstuhjálp í pedagogikki, tykir mær løgið, sigur Beinta.

## Í Havn ella aðrastaðni

Fólk, sum hava hug at taka lut á skeiði hjá Beintu, kunnu sjálvi gera av, um tað skal vera í Havn ella á heimstaðnum. Beinta hevur dúgliga ferðast kring landið at halda skeið, tá tað hevur verið ynskiligt. Men tað eru eisini tey, sum ynskja heldur at koma á skeið saman við starvsfeløgum úr øðrum økjum enn sínum egna, og tað heldur Beinta eisini kann hava sínar fyrimunir. Fyri at gera skeiðini so bílig sum gjørligt hevur Beinta síni skeið heima hjá sær sjálvari, tá skeiðið er í Havn, og er skeiðið uttan fyri Havnina, leggur onkur stovnur ella skeiðsluttakari høli til. Av somu kostnaðarligum orsøkum borðreiðir hon heldur ikki við øðrum enn kaffi og te, og luttakararnir hava matpakka við. Kostnaðurin fyri eitt seks-daga skeið er 3.000 krónur.



*Beinta Nattestad, pedagogur*

# NÝKLAKTIR NÁMSFRØÐINGAR
## Á FØROYA LÆRARASKÚLA



**Aftast frá vinstru:** Sonja Olsen, Fríða Petersen, Rúna Gaardbo Petersen, Eiler Sørensen, Tórfríð Tavsen, Laila Æðustein Thomsen, Kári Troest.
**Í miðjuni frá vinstru:** Anja Jacobsen, Elisa Hjørdis Joen-Jacobsen, Kaja Joensen, Jannet Johannesen, Joan Evi Johannesen, Ingun Johansen, Sunrid Lamhauge, Aðalbjørg Linklett, Kristrunn Nicodemussen.
**Fremst frá vinstru:** Elly Katrine Andersen, Noicolina Bára Andersen, Birita Arge, Tinna Dahl, Rúna Skoubo Dalsgaard, Poula Skorheim Guttesen, Sigga Guttesen, Jónleyg E. J. Hansen, Emily Hansen, Sóley Hansen.



*Próvhandan*



*Nevndarlimirnir heilsa nýggju námsfrøðingunum*



*Næmingarøðan, Sonja Olsen*

Elly K. Andersen úr Havn flutti til Keypmannahavnar vikuna eftir, at hon tók prógv sum námsfrøðingur. Elly fer at lesa pedagogiska sosiologi (cand. pæd.soc) á DPU í august og fer at arbeiða sum pedagogur, inntil hon byrjar lesturin. Harafturat fer Elly at arbeiða sum sjálvboðin mentor á einum kvinnusentri á Nørrebro, har hon skal virka sum stuðul hjá innflytarakvinnum í teirra integratiónsprosess.



Sóley Hansen av Argjum fer at arbeiða á Dagstovninum í Øksnagerði komandi hálva árið. Aftan á tað kundi hon antin hugsað sær at farið og arbeitt á Barnaheiminum í Uummannaq, ella at lisið víðari í Íslandi ella Danmark, møguliga pedagogiska sosiologi.



Nicolina B. Andersen úr Havn hevði ikki funnið sær arbeiði, tá ið hon fekk prógvið. Nicolina veit ikki nágreiniliga, hvørjum hon fer at arbeiða við sum námsfrøðingur, men hon brennur serliga fyri at arbeiða við ungum. Nicolina umhugsar at fara at lesa eftir summarfrítíðina, møguliga umvegis Netið.





Kári Troest úr Saltangará var ein teirra, sum tók prógv sum námsfrøðingur hendan dagin. Kári hevði ikki funnið sær arbeiði enn, men kundi hugsað sær at arbeitt á serøkinum.

## Evnini, sum teir nýklaktu námsfrøðingarnir hava verið til synnopsupróvtøku í, eru hesi:

- Náttúran sum menningarstaður
- Umsorganarsvíkur
- Tann rúmligi dagstovnurin
- Námsætlanir og børn við ADHD
- Tónleikur og tónleikaligt virksemi og týdningurin tess í námsfrøðiligum høpi
- Samleiki
- Tannáringar
- Skúlabúgvin
- Børn og sorg
- og so nóru tveir bólkar uppi í evninum: Tilknýti



Tinna Dahl, sum er ættað av Strondum, men sum býr í Saltangará, hevur fingið arbeiði sum námsfrøðingur á Frítíðarskúlanum á Strondum.

# NÝKLAKTIR NÁMSFRØÐINGAR
## Í NETLESNAÐI



***Aftast frá vinstru:** Ester Gregersen(lærari), Mia Samuelsen, Klaksvík, Rakul N. í Lágabø, Vágur, Hildur L. Jákupsdóttir, Leirvík, Halgerð Jacobsen, Tórshavn, Miriann Poulsen, Nólsoy*
***Í miðjuni:** Doris Olsen, Velbastaður, Eyðhild Mørk, Vágur, Sólvá Valle, Tórshavn, Hervør Nolsøe, Klaksvík, Anna Jørmundsson, Fuglafjørður, Arnleyð Hjelm, Vágur, Hansina Clementsen, Tórshavn, Maja Joensen, Viðareiði.*
***Sitandi fremst:** Helena Hergeirsdóttir, Vágur, Helin Rasmussen, Hósvík, Ruth Jacobsen, Klaksvík, Elsa L. Leo, Leirvík, Anja Clementsen, Klaksvík, Sólgerð Joensen, Klaksvík.*

## PRAKTISKU ROYNDIRNAR **KOMU VÆL VIÐ**

*Drúgvu praktisku royndir okkara gjørdi okkum førar fyri at vera meira kritiskar mótvegis bókligu læruni, siga Doris, Halgerð og Hansina, sum júst hava staðið próvtøku sum pedagogar á bachelorstøði.*

Doris Olsen, Halgerð Jacobsen og Hansina Clementsen eru millum tær 19 føroysku kvinnurnar, sum fyrr í ár tóku prógv í pedagogikki á bachelorstøði. Talan er um ein føroyskan flokk, sum fyri trimum árum síðani byrjaði fjarlestur á donskum lærustovni, men hóast tað kundi nógv hin størsti parturin av lærutíðini fara fram í Føroyum. Á tann hátt bar eisini teimum øllum til at halda fram í sínum starvi, samstundis sum tær nomu sær útbúgvingina.

### Royndir á dagstovnaøkinum

Doris hevur arbeitt sum hjálparfólk á dagstovninum Birkilund í Havn í meir enn 20 ár. Seinnu tvey árini av lestrartíðini hevur hon arbeitt niðursetta tíð, og teir báðar seinastu mánaðirnar hevur hon verið í farloyvi. Av tí at hon alla tíðina hevur arbeitt á dagstovnaøkinum fór starvsvenjingin fram á serstovnaøkinum, á Sambýlinum í Pætursgøtu. Doris ætlaði annars at nema sær pedagogútbúgvingina í Føroyum, men hóast hon søkti ikki færri enn fýra ferðir, var eingin vón. Praktisku royndir hennara taldu ikki í so máta, og av tí at hon hvørki hevði students- ella HF-prógv, bar ikki til. At hon hevði FHS-prógv og sálarfrøði á HF-støði, var ikki nóg mikið til at røkka upp um gáttina á Frælsinum. So var bert ein møguleiki eftir, og tað var at søkja inn á danska skúlan, og tá bar til, fyrstu ferð hon søkti.

– Eg hevði lítlan hug at fara undir eina trý ára útbúgving, áðrenn eg kundi koma á pedagogskúla, sum eg so fegin ynskti mær. Partvíst tí at eg fegin vildi hava eitt prógv, og við tí eru eisini størri møguleikar at velja millum pedagogisk størv, sigur Doris.

### Royndir á serstovnaøkinum

Áðrenn Halgerð fór undir pedagogiska lesnaðin, hevði hon starvast á ymiskum deildum á Føroya Barnaheimi í stívliga tjúgu ár, og síðani nøkur ár á Sambýlinum í Pætursgøtu. Starvsvenjingin skuldi tí fara fram á dagstovni, á vøggustovuni í býlingshúsinum í Maritugøtu. Halgerð var í farloyvi frá sambýlinum í Pætursgøtu, meðan hon var í starvsvenjing og tann seinasta partin av lestrartíðini.

– Hóast mínar drúgvu starvsroyndir var mín dreymur at nema mær útbúgvingina. Søkti



*Halgerð, Hansina og Doris hava lokið pedagogútbúgving við fjarlestri.*

tríggjar ferðir í Føroya Læraraskúla, men einki bar til. Hví veit eg ikki, og hóast eg tók nakrar stakgreinir í ymiskum lærugreinum á HF støði, fekk eg ongantíð at vita, hvør forðingin var, og hvat eg kundi gera fyri at sleppa upp í part á føroyska skúlanum. Eg hevði tí mest sum mist mótið at sleppa at læra, men so kom hesin møguleikin. Eg tók av, og tað angri eg ikki, sigur Halgerð. Nú kann eg gleðast um, at eg á henda hátt við fjarlestri havi fingið útbúgving á BA støðið.

## Byrjaði á donskum holdi

Eftir at hava gingið á studentaskúlanum eina tíð varð Hansina greið yvir, at tað var ikki júst hennara stóri áhugi. Au-pair í London í eitt ár og hevur síðani tikið handilskúla og arbeitt á skrivstovu, og seinastu 6 árini í barnagarðinum Dagstovninum við Løgmannabreyt. Eftir at hava verið í starvsvenjing á sambýlinum á Eysturstræti, hevur hon eisini havt fastar vaktir á bústovninum á Sólteigi, sum er ein bústovnur fyri sálarliga sjúk. Ein av orsøkunum til, at Hansina valdi donsku útbúgvingina heldur enn ta føroysku, er, at danska útbúgvingin var á bachelorstøði, og tað var tann føroyska ikki tá.

Hon byrjaði nakað undan Doris og Halgerð á danska skúlanum í flokki millum danir, men eftir at føroysku næmingarnir gjørdust so mikið fjølmentir, at serligur flokkur kundi gerast fyri teir, valdi hon at flyta yvir til sínar føroysku starvsfelagar. Hetta var eisini munandi bíligari, tí nú skuldi hon ikki ferðast til Danmarkar fimta hvørt vikuskifti.

## Skrivligt samskifti

Meginpartin av lestrartíðini hava tey lesandi verið heima í Føroyum, og tey hava meira ella minni samstundis havt møguleika at røkja sítt starv. Tær tríggjar greiða frá, at alt samskifti við lærararnar hevur verið skrivligt, burtursæð frá teimum umleið 5-6 ferðunum, lærararnir hava verið í Føroyum. Okkurt styttri tíðarskeið hava tær lesandi tó verið í Danmark. Allar royndir hava verið í Føroyum, fleiri teirra á Fróðskaparsetrinum, burtursæð frá seinastu bachelor próvtøkuni, sum fór fram í Danmark.

Nú alt samskifti skuldi fara fram skrivliga, ráddi um at vanda sær væl um tað, sum skrivað varð, tí tað, sum fór við teldupostinum, kundi takast aftur, men tað var møguligt hjá bæði lærarum og næmingum at lesa og gera viðmerkingar, áðrenn tú kanska hevði tikið teldupostin aftur. Eitt sindur løgið tóktist tað fyrstu tíðina at sita einsamøll og samskifta við skúlan, men væl av tíð fór eisini við bólkaarbeiði, og onkuntíð savnaðist allur flokkurin, m.a. við Gjógv, siga Doris, Halgerð og Hansina, sum vóru í bólki saman. Tær eru samdar um, at nógv tíð var ikki til familjulívið, so tað kravdist gott tol og samstarv millum allar partar.

## Alt á donskum

Øll undirvísingin fór fram á donskum, men tað halda tær tríggjar ikki hevur verið til nakran bága. Tað skal eisini sigast, at ein av lærarunum skilti væl føroyskt og kundi eisini tosa nakað av tí føroyska málinum. Ein annar lærari hevði eisini búð í Føroyum eina tíð. Tær halda seg ikki vera danskar pedagogar í føroyskum hami, tí stórur dentur varð eisini lagdur á føroysk viðurskifti. At heldur ikki málið var nakar trupulleiki, sæst eisini av úrslitinum, har hesin føroyski flokkurin kom út við besta úrslitinum nakrantíð frá hesum skúla.

## Stríðið vert

At nema sær eina tílíka útbúgving á hendan hátt er kostnaðarmikið, ikki minni enn 100.000 krónur í part, og av tí, at tær eisini høvdu lønandi arbeiði, fingu tær ongan útbúgvingarstuðul.

Doris, Halgerð og Hansina eru samdar um, at lestrartíðin hevur verið sera strævin, tá tær eisini skuldu røkja sítt vanliga starv, men alt hevur verið stríðið vert, nú tær hava prógvið í hondini. Tær halda nú fram í sama starvi, nú ikki longur sum hjálparfólk men sum útbúnir pedagogar.




# MYNDIR *fyri lívið*

Myndir, tiknar í vøggustovuni, barnagarðinum ella hjá dagrøktini, eru ógloymandi minni at eiga, bæði hjá einstaka barninum, stovuni og stovninum.

Vit taka góðar andlitsmyndir av børnunum og felagsmynd, har møguleiki er at seta nøvn undir.

Eisini fær stovnurin fløgu við myndum av bæði einstaka barninum og felagsmynd.

Barnið fær:

- 1 mynd 13x18 lit
- 2 myndir 10x15 s/h **NÝTT!!**
- 2 myndir 10x15 lit
- 4 myndir 6x9 lit
- 8 passmyndir lit
- 1 bólkamynd 15x20 lit

Til ber at bíleggja eyka myndir.

*Ring og hoyr nærri um, hvat vit hava at bjóða*

FOTOSTUDIO

*Per á Hædd, Finnur Justinussen og Helena Dam*

WWW.FOTOSTUDIO.FO · INFO@FOTOSTUDIO.FO · TEL. 317111




AT VERA FAMILJA

Eik Banki Føroya P/F
Tel. 348000, www.eik.fo

## Fá tíð til tað, ið veruliga hevur týdning

Við árligum heildarpráti við tín kundaráðgeva kanst tú kenna teg trygga. Í heildarprátinum tosa vit um tykkara fíggjarviðurskifti, ætlanir og dreymar.
Saman gjøgnumganga vit m.a. uppsparingina hjá børnunum og tykkum vaksnu, pensjónsviðurskifti og hvussu bústaðurin verður fíggjaður á besta hátt. Tú fært yvirlit yvir fíggjarviðurskiftini og harvið yvirskot at taka tær av tí, sum hevur størsta týdning.


lív.fo
Fá eitt ríkt lív
Lív hjálpir tær at fáa tað fíggjarliga í trygga legu
Hvør eftirløn hóskar best til tín?
Lív bjóðar sær at laga tína eftirløn til tað lívið, tú vilt liva, og ta framtíð, tú hevur útlit til.
Kom inn á liv.fo og fá innlit í, hvør eftirløn hóskar best til tín.
Trygg eftirløn
Eftirlønin mennist javnt og støðugt, og tú fært trygd fyri fastari veiting.
Samansett eftirløn
Tað besta úr báðum: tú fært tryggleika, umframt møguleika fyri størri avkasti.
Marknaðareftirløn
Íløgan fylgir marknaðinum, og gevur møguleika fyri ávirkan og størri avkasti.
Innlit í útlit